# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG

01
12



# Úr innihaldinum


| | |
|---|---|
| Oddagrein | 2 |
| Tíðindi frá felagnum | 4 |
| Ársaðalfundur | 6 |
| Normeringar, sosialpedagogisk vangamynd, sosial lóggáva og rættvísari lønir | 8 |
| Vit skula gera okkara fak sjónligari | 9 |
| Líkasælir myndugleikar | 11 |
| Jannie fyri Jórun | 11 |
| Limirnir gjørdu eitt framúr gott arbeiðið | 12 |
| Stuðuksváttanir | 16 |
| Fingu staðfest fyrireikingartíðina og bastu differentieringini | 17 |
| Semjan | 17 |
| Lønartalvur | 18 |
| Frágreiðing frá nevndini 2012 | 22 |
| Ein spurningur um dygd | 26 |
| Virknir pedagogar í verkfalli | 27 |
| Námsferð | 30 |
| Pedagogisk vøddamýking | 31 |
| Nýklaktir námsfrøðingar | 31 |


# Oddagrein



Maud Wang Hansen



Elin N. W. Tausen

## Góðu limir
## í Føroya Pedagogfelag

Tað er við stoltari kenslu, at eg byrji hesa oddagrein. Ongantíð havi eg havt eina so sterka fatan av, hvat samanhald er, sum nú eftir verkfallið hjá Føroya Pedagogfelag. At uppliva, at fólk á gøtuni taka í hondina og siga: "Hatta var flott klárað", "Til lukku við sigrinum", "Tit dugdu ómetaliga væl, og tit lupu ongantíð framav"," Hatta var eitt flott verkfall" og meira aftrat. Ja, hetta var eitt flott verkfall; eg veit ikki, hvør kann siga tað um eitt verkfall, sum vardi í 22 dagar. Onga løtu sá tað út til, at vit fóru at missa samanhaldið, hóast vit gjørdust móð og óð. Hvørja ferð ein feril av mistreysti bankaði á dyrnar, møtti eg limum, sum góvu eitt herðaklapp og søgdu: Vit standa her, og vit gevast ikki. Fólk ringdu, sum einki høvdu við Pedagogfelagið at gera, fyri at rætta eina hond og fyri at gera vart við seg og siga, at tey stuðlaðu okkum. Fleiri ringdu og vóru hørm um, at ikki fleiri feløg vóru saman í hesum stríðnum fyri betri viðurskiftum. Vit valdu at gera tað á hendan hátt, og tað eru vit stolt av.

Árið 2012 verður eitt merkisvert ár, tí longu nú hava vit skrivað søgu.

Elin N.W. Tausen hevur skrivað eina grein um verkfallið, og verður hon prentað her, tí hon sigur so nógv og hóskar tí sera væl sum oddagrein.

### Tit hava flutt fjøll

*Tað at taka eina avgerð um at senda limirnar í verkfall er ikki ein løtt avgerð, tí tú stendur við óvissuni um, hvat kunnu vit vænta at koma útaftur við.*

*Tann kenslan, eg siti við nú, er, hvussu fantastisk álitisfólk og limir vit hava í Føroya Pedagogfelag, tí tit fóru bara til verka. At finna høli, skipa fyri mótmælisgongum og tiltøkum v.m. Sum nevndarlimur verði eg ofta møtt við hesum, at tað er ótrúligt, sum tit dugdu væl at finna uppá og skipa fyri tiltøkum undir verkfallinum, og tá má eg siga, at tað eru limirnir í felagnum, sum hava staðið fyri øllum tí. Tit eru fantastisk! Men vit skulu ikki gloyma, at til tíðir kendist tað tungt, tí tíðin bleiv so long. Kanska serliga tungt mundi tað kennast fyri álitisfólkini, ið vóru tey, sum skuldu svara spurningum og møta frustratiónunum, sum óvissan førdi við sær. Men tit megnaðu tað væl, eisini at lyfta stemningin aftur.*

*Fyri okkum nevndarlimir var tað tykkara ágrýtni, sum gav okkum orku, at merkja, at tað hendi alla tíðina okkurt kring landið. Tann týdningur, sum tykkara ágrýtni og hugflog hevði fyri nevndina, kann ikki lýsast í orðum! Persónliga kann eg siga, at av og á kendist støðan eitt sindur tung, og eg misti eitt sindur mótið. Men so t.d. at standa hendan morgunin niðri á Vaglinum og síggja øll hjørtuni umboðandi tykkum limir var ein so lívsjáttandi løta, sum gav áræði og dirvi aftur.*

*So er verkfallið liðugt, semja er funnin, og kenslan "var hetta tað?" treingir seg inn á okkum. Alla ta orku, vit hava lagt í verkfallið, og so bara hetta? Sum nevndarlimur fái eg eisini ta kensluna, men samstundis veit eg, at eg havi verið við til at flyta fjøll. Tit hava øll verið við til at flutt fjøll, tí uttan tykkara ágrýtni og vilja, so høvdu fjøllini ikki flutt seg. Trupulleikin er bara, at vit síggja ikki enn, at landslagið hevur broytt seg, tí vit eru ikki komin nóg langt burtur frá, til at vit kunnu síggja munin. Men um eina tíð fara vit at fegnast um, at vit vóru við, tá vit fingu staðfest í okkara sáttmála, at tíð skal setast av til at fyrireika og eftirmeta pedagogiskt arbeiði.*

*Fjøllini eru tó ikki bara flutt á pappírinum, men myndin av og forstáilsi fyri pedagogum og pedagogiskum arbeiði er økt, bæði hjá vanliga føroyinginum og ikki minst hjá politiska myndugleikanum. Og tað er nakað, vit avgjørt skulu brúka víðari í okkara stríði fyri at betra um viðurskiftini innan tað pedagogiska arbeiðið.*

Tað kennist, sum tíðin frá jólum til páskir er tikin úr kalendaranum. Eg fór ein dagin í tveir handlar í SMS og spurdi, eftir at hava hugt eina løtu, um tey ikki høvdu útsølu. Í báðum støðum svaraðu tey mær, at útsølan var liðug fyri einum mánaði síðani. Tíðin var horvin, eins og í einum ævintýri, har tíð og stað ikki eru verulig.

Í ljósinum av hesum fari eg at takka fyri mína fyrstu setu og gleði meg til trý tey komandi árini sum forkvinna í Føroya Pedagogfelag. Eg fari at takka Jórun fyri góð ár og sera gott avrik í nevndini. Somuleiðis fari eg at bjóða Janni S. Jacobsen vælkomna í nevndina. Spennandi verður eftir aðalfundin at síggja, hvussu nevndin tá verður mannað. Eg gleði meg til aðalfundin og vóni at síggja nógv tykkara aftur.

2012 er árið, har vit fylla 30 ár, og longu hava vit skrivað søgu fyri at hava ført Føroya flottasta verkfall. Takk fyri tað, góðu limir.


# KOLOFON

**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag, Postboks 318
110 Tórshavn – Tlf. 35 75 76 – Fax 35 75 73
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 22 92 42 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www.foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Maud Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2500 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.
**FORSÍÐUMYND** Vaglið, Alan Brockie

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705




# Fá upp til

# 32% í avsláttri

**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**





**Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

# NEVND



**Maud Wang Hansen**
forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Jógvan Philbrow**
næstformaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Elin N. W. Tausen**
skrivari
elin@pedagogfelag.fo



**Jórun Ennistíg**
nevndarlimur



**Guðrun Eysturlíð**
nevndarlimur
gudrun@pedagogfelag.fo

# UMSITING



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Katrin Poulsen**
Málsviðgeri
katrinp@pedagogfelag.fo



**Eyðvør á Váli**
Málsviðgeri
eydvor@pedagogfelag.fo



**Anna Dalsgarð**
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo

## TÍÐINDI FRÁ FELAGNUM



**SKRIVSTOVUTÍÐ:**

Mánadag til mikudag 9-13
Hósdag 9-16
Fríggjadag er stongt

Skrivstovan er stongd í páskavikuni frá 1. til 10. apríl.

Átrokandi boð kunnu sendast felagnum í telduposti

# Jógvan og Poula

## stilla upp til nevndina



*Jógvan Philbrow, pedagogur*



*Poula Eidesgaard, pedagogur*

# Leiðararáðið

### Endamálið er:

- At lýsa støðuna og møguliga tørvin hjá stovnum og leiðarum yvirfyri nevndini.
- At koma við uppskotum um, hvussu nevndin og leiðarar í felag kunnu lyfta økið, bæði fakliga og fyrisitingarliga.

### Arbeiðsuppgávurnar eru:

- At bjóða ráðgeving til leiðarar.
- At savna og samskipa uppskot til nevndina, til dømis til sáttmálasamráðingar, leiðaraprofil og annað.
- At bjóða hjásitara.
- At skipa fyri árliga Landsleiðaradegnum.
- Fyri at vita, hvat rørir seg millum leiðarar, er tað av týdningi, at vit hoyra frá tykkum.

*Tel. nr. 28 75 74*

*Telefonin er opin frá kl. 9.00-16.00 gerandisdagar.*
*Um vit ikki svara, vinaliga send eini sms boð og vit venda aftur til tín.*

*leidarin@pedagogfelag.fo*

**Í leiðararáðnum eru:**
Joan Midjord, Marjun Hentze, Poula Ejdesgaard, Nancy Poulsen og Mirjam Johannesen

## Tann árligi leiðararáðsdagurin verður í Tórshavn 9. mai kl. 9.15

**Í ár standa Marjun Hentze og Nancy Poulsen fyri vali**

**Fyribils skráin er hendan.**

1. **Ársfrágreiðing frá leiðararáðnum**
2. **Val til leiðararáðið**
3. **Ymiskt**

**Kunning um stað og møgulig broyting til skránna, verður løgd út á heimasíðu felagsins.**

# Hjálparfólk fáa greiða pensjón í BankNordik

BANKNORDIK

Hjálparfólk fáa eina pensjón í BankNordik, har arbeiðsgevarin rindar 10% afturat lønini. Pedagogfelagið hevur serligan sáttmála við BankNordik um hesar pensjónskontur. Eins og allir aðrir limir í Pedagogfelagnum eru hjálparfólk í fastløntum starvi eisini fevnd av eini samlagstrygging.

Pensjónin gevur tær eitt gott grundstøði og kann tillagast til júst tín tørv.

Hjá okkum fært tú holla ráðgeving um, hvørt tær tørvar at rinda meira fyri at fáa eina nøktandi pensjón, og um tín trygging er nøktandi. Eisini fært tú ráðgeving um tínar møguleikar fyri størri avkasti.

**Bílegg eitt prát**

Ring 330 330 ella skriva til kundi@banknordik.fo fyri at fáa greið boð um júst tína pensjón

**www.banknordik.fo**

SENDISTOVAN




# Ársaðalfundur felagsins verður á Hotel Føroyum tann 14. apríl 2012.

**Dagurin byrjar við skráseting kl.10.00. Atkvøðuseðlar verða útflýggjaðir í skrásetingini.**

Fundurin byrjar kl.11.00 við hesi fundarskrá:

A. Val av fundarstjóra og skrivara
B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar
D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar
F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins
G. Val av formanni triðja hvørt ár
H. Val av nevnd
I. Val av eykalimum
J. Val av grannskoðarum
K. Viðgerð av innkomnum uppskotum og áseting av limagjaldi
L. Ymiskt

## Felagið bjóðar døgurða kl.18.00, og aftaná verður tónleikur og hugni til á midnátt.

**Gisting:** Limir, sum luttaka á aðalfundinum, kunnu leiga kamar á Hotel Føroyum ella á Hotel Tórshavn fyri 600 kr. fyri eitt einakamar, og 800 kr. fyri eitt dupultkamar. Morgunmatur er við í prísinum.

Tilmeldingin, sum er persónlig, fer fram á heimasíðu felagsins www.pedagogfelag.fo ella við at ringja á tel. 357576. Seinasta freist at tekna seg til aðalfundin er tann 30.mars kl.14.00.

## Vælkomin á aðalfund

## Brævatkvøðugreiðsla

§8, 7.stk. Tá nevndarval og formansval skal fara fram, eru hesar reglur galdandi:
1. Skrivlig atkvøðugreiðsla.
2. Teir limir felagsins, sum ynskja tað, kunnu í seinasta lagi vikudagin undan aðalfundinum greiða brævatkvøðu við í seinasta lagi hendan dag at lata nevnd felagsins brævatkvøðuseðil sín.
Nevnd felagsins skipar fyri hesari brævatkvøðugreiðsluni, soleiðis at brævbjálvarnir við brævatkvøðunum ikki verða latnir upp, fyrr enn í sambandi við uppteljingina á aðalfundinum.
Nevndarlimur, sum stendur fyri vali, skal tó ikki skipa fyri brævatkvøðugreiðsluni.
6. Brævatkvøðuseðil verður latin teimum limum felagsins, sum ynskja at greiða brævatkvøðu.
7. Teir limir, sum innan freistina í pkt.2 hava greitt brævatkvøðu, kunnu ikki greiða atkvøðu á aðalfundinum í sambandi við tey val, har viðkomandi hevur latið nevndini brævatkvøðuseðil sín.

## G. Formansval

Fyri vali stóð Maud Wang Hansen. Eingin hevur valt at stilla upp til formansvalið, og verður forkvinnan tí sitandi næstu trý árini.

## H. Nevndarval

Tveir nevndarlimir standa fyri vali.
Jórun Ennistíg, hjálparfólk, stillar ikki upp aftur. Fyri hana kemur Jannie Jacobsen, hjálparfólk, ið er einasta hjálparfólk, sum stillaði upp til nevndina. Hon er tí vald fyri næstu trý árini.
Fyri vali stendur Jógvan Philbrow, pedagogur. Hann stillar upp aftur.
Poula Ejdesgaard, pedagogur, stillar upp til nevndarvalið.
Sostatt veður valið um tann eina nevndarsessin millum Jógvan Philbrow og Poulu Ejdesgaard.
Nevndin skipar seg á fyrsta nevndarfundi eftir aðalfundin.

## I.Val av eykalimum

§11, 4.stk. Eykalimir. Valdir verða 3 eykalimir. Av hesum eykalimum skal minst ein vera hjálparfólk og minst ein pedagogur.
Eykalimir verða valdir á ársaðalfundinum hvørt ár, og valskeiðið er tí eitt ár.
Reglurnar í § 8, stk.7, pkt.1,3,8,9 og 10 eru eisini galdandi fyri val av eykalimum. Fyrstvaldi eykalimurin tekur við, tá ein av verandi nevndarlimum fer frá ella ikki kann møta í longri tíð. Eykalimurin situr fyri viðkomandi nevndarlim, so leingi hesin er burturstaddur, tó ikki longur enn til komandi ársaðalfund, tá valskeiðið hjá eykaliminum gongur út.
Talið á atkvøðum, sum hvørt valevni fær, er avgerandi fyri, hvør er fyrst- annar- og triðivaldur.
§ 8, stk.7
1. Skrivlig atkvøðugreiðsla.

3. Bert fullgildigir limir felagsins kunnu stilla lim upp sum valevni.
8. Limur, sum greiðir atkvøðu, kann í mesta lagi greiða atkvøðu fyri so nógvum av teimum uppstillaðu valevnunum, sum talið á teimum, sum standa fyri vali.
9. Tey valevni, sum fáa flestar atkvøður, eru vald, tó skulu ásetingarnar í § 11,stk.2 verða uppfyltar.
10. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, so verður lutakast millum tey valevni, sum fáa líka nógvar atkvøður.

## J. Val av grannskoðarum

Sambært ásetingunum í § 13, stk 2 skulu internir grann-skoðarir veljast hvørt ár.
Internu grannskoðarar eru:
Mirjam Johannesen
Vera Bjørgvin

## K. Viðgerð av innkomnum uppskotum og áseting av limagjaldi

1. Uppskot um áseting av limagjaldi
Uppskot er til aðalfundin um at broyta limagjaldið soleiðis, at tað framyvir verður 1,8% í staðin fyri sum nú 1,6% av lønini.
2. Strika hesa orðing í grein 11, 2. og 4. stk: „Av teimum fimm nevndarlimunum skal minst ein nevndarlimur vera pedagogur og minst ein vera hjálparfólk". „Av hesum eykalimum skal minst ein vera hjálparfólk og minst ein pedagogur".


Er handritið klárt til prentingar?



Tað eru bara **fáir dagar** frá einum prentklárum handriti til eina **lidna bók**. Eina **einstaka bók** ella **fleiri túsund bøkur**. Vit framleiða bøkurnar eftir **tínum ynski** og hava framkomna útgerð, eisini til smáar nøgdir. Hevur tú brúk fyri **rættlestri**, **umbróting** og **grafiskari uppseting**, gera vit tað **fegin**.

Prísdømi
100 bøkur við bleytari permu
Støðd 13,5x21 cm
120 s., litperma og s/h innan
90 g pappír
**2.200 kr.** + mvg
*prent og liðuggerð*

facebook Føroyaprent plantar trø á Facebook

Føroyaprent – ger mun

Hoyiksvegur 59 I 100 Tórshavn I Tel. 314555 I info@foroyaprent.fo I www.foroyaprent.fo



# Netbankin sum app

Avgreið tey flestu bankaviðurskiftini tá tað passar tær

Við Netbanka sum app kanst tú m.a.
- síggja salduyvirlit
- síggja IBAN nummar
- gera flytingar
- gjalda rokningar
- rokna gjaldoyra
- fáa samband við bankan



SUÐUROYAR SPARIKASSI



*Jógvan Philbrow, pedagogur*

# Normeringar, sosialpedagogisk vangamynd, sosial lóggáva og rættvísari lønir

*Hesi yvirskipaðu viðurskifti, ein normeringslykil, betri viðurskifti á serøkinum og rættvísari lønir, eiga at koma upp á pláss, men tað tekur tíð, orku og miðvíst arbeiði.*

Verkfallið staðfesti tað, sum eg í áravís havi víst á, at tað er meira átrokandi enn nakrantíð at fáa eina nýggja sosiala lóggávu setta í verk. Ein lóggáva, sum eigur at tryggja teimum veikastu í samfelagnum góð kor, og at tey, sum skulu arbeiða við teimum, fáa greiðari og betri karmar at virka undir.

Tað er tí meira neyðugt enn nakrantíð at arbeiða við at fáa eina tíðarhóskandi lóggávu, og hetta fer saman við arbeiðinum at gera sosialpedagogisku vangamyndina at styrkja tey starvsfólk, sum arbeiða á serøkinum.

Vit fingu fyrireiking og eftirmeting inn í sáttmálan – og tað er slóðbrótandi í sær sjálvum. Eg havi somuleiðis eina vón um at hetta „smittar“ yvir á serøkið.

Tá vit hugsað um tíð til fyrireiking og eftirmeting, vita vit, at best hevði verið, um játtanir fylgja við. Leingi hava „normeringar“ staðið á dagsskránni. Nú er slóðað fyri, at tað ber betur til at arbeiða við normeringstrupulleikanum. Vit hava nú fingið við, at ymiskar uppgávur skulu loysast, og at tíð skal brúkast til tær. Arbeiðast skal tí fram ímóti, at ein dagførdur normeringslykil, sum ásetur ymisk viðurskifti, her ímillum fyrireikingar- og eftirmetingartíðina, verður gjørdur. Tí sjálvandi pínir tað, um tíðin fer frá børnunum/brúkarunum.

Lønarviðurskiftini koma ikki upp á pláss, fyrr enn felags almennar reglur vera gjørdar um, hvussu almenn størv skulu flokkast og lønast. Ikki fyrr enn tá ber til at javna teir skeivleikar, sum eru í almenna lønarlagnum. Hetta er heldur ikki nakað, sum verður gjørt eftir einum degi, men vónandi í nærmastu framtíð.

Jógvan Philbrow

## *Avrikslistin*

- Lønirnar hækkaðar við áleið 15%
- Pedagogisk ábyrgd ásett sum hugtak
- Sáttmálasett hjá landinum 14% í eftirløn
- Javnseta byrjanarlønina hjá pedagogum á dagstovnaøkinum og hækka 1 endastig
- Hækka leiðaralønirnar á dagstovnaøkinum við 1 stigi
- Førleikaviðbøtur inn í sáttmálan
- Broytt varaleiðaraáseting til +1, +2 og +3, soleiðis at varaleiðarar kunnu lønast eftir støðd á stovni
- Dagrøktarleiðarar lønast sum dagstovnaleiðarar
- Undirvísingarløn
- Arbeiðstíðarreglur fyri landsins stovnar (í gildi 2008)
- Tíð til fyrireiking og eftirmeting




*Poula Eidesgaard stillar upp til nevndarvalið í Føroya Pedagogfelag. Her er hon avmyndað uppi á Tindi í Oyndarfirði ein summardag í fjør. Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard.*

# Vit skulu gera okkara fak sjónligari

*Tað er tilvitanin um fakið, ið fær fakið at vaksa, er hon sannførd um.*

„Vit eiga at halda okkum til at tosa og skriva um námsfrøðina, tí vit vita, hvat námsfrøði er, vit hava royndirnar, og her skal ein hugburðsbroyting til hjá okkum øllum."

Eg eiti Poula Eidesgaard. Eg eri útbúgvin námsfrøðingur og havi eina 3 ára eftirútbúgving sum psykoterapeutur. Eg starvist sum leiðari í Býlingshúsinum Inni á Gøtu í Hoyvík. Eg havi verið skrivari í Leiðararáðnum síðani 2010.

Eg vil á hendan hátt bjóða meg fram til nevndarvalið til ársaðalfundin hjá Føroya Pedagogfelag, tí eg havi nakað upp á hjartað.

Eg havi sitið í Leiðararáðnum í tvey ár, og hevur hetta vakt mín áhuga fyri nevndararbeiðinum hjá felagnum.

Nú vil eg bjóða meg fram at arbeiða fyri øllum limunum í Føroya Pedagogfelag.

Eg ynski og vil arbeiða fyri, at vit sum felag fara at varpa enn meira ljós á okkara fak millum limirnar á øllum økjum á tí námsfrøðiliga økinum.

## Vit duga sjálv

Vit innan okkara fak vita eina rúgvu um námsfrøði, og tað, ið manglar, er at fáa hesa vitanina út. Ofta fara vit yvir um ánna eftir vatni. At onnur duga betur enn vit. Vit hava hesa vitanina um okkara fak. Tað, ið manglar, er at tora og at halda, at tað, sum eg veit, hevur týdning fyri onnur at vita eisini. At halda seg til at undirvísa í okkara faki, at tora at ringja til ein av okkara limum um at koma at halda ein fyrilestur ella at hava eitt upplegg til ein foreldrafund, starvsfólkafund, ráðleggingardag, ikki at hugsa, sum vit ofta plaga, at onnur vita betur enn vit. Tað skal ein hugburðsbroyting til, sum eitur at vit duga sjálv.

Vit eiga nógv góð fólk til at undirvísa í námsfrøði, ið er okkara fak, og vit hava serkunnleika á okkara øki.

Vit skulu brúka okkum sjálv, tora at fara út um komfortsonuna. Vit duga og tora, tað sóu vit, tá ið verkfallið var; har vóru nógvar góðar kreftir, sum bæði skipaðu fyri, skrivaðu, hildu talu og bóru boðskapin fram í fjølmiðlunum um okkara fak.

Vit eiga at nøra um fakið við at geva vitanina víðari, bæði ástøðið og hvussu tú heilt konkret brúkar hesa vitanina í gerandisdegnum. Tað er her, vit eru serkøn á økinum. Longu nú liggur eina rúgva av vitan úti á øllum stovnum, har vit arbeiða. Vit eiga at gera hesa vitanina sjónliga og geva hana víðari til onnur, so fakið nørist enn meira.

## Vit eru serkøn

Her er ein lítil moli av hugsaðum evnum, ið vit hava vitan um, og sum kundi verið ein grein, ein fyrilestur, eitt tema:

Námsfrøðilig tiltøk, fyribyrging av happing, tann góða samrøðan, tað góða borðhaldið, tann góða rundan, kropslig menning av brúkarum á serøkinum og á dagstovnum, foreldrasamrøður, ymisk amboð sum stig fyri stig, Trass, tekn til talu, um autismu, um ymisk brek, inklusión, viðurkennandi námsfrøði, spæli og læri støð, servitan um tekningar hjá børnum, servitan um ymiskar mátar at menna brúkarar á verkstøðum, hvussu gert tú eitt skriv til myndugleikar, kreppur, hvussu loysir tú trætur, skipaða samrøðan, supervisón, kreativitet av ymiskum slag, vitan um skúlabólk ella tey seks ára gomlu, hvussu fert tú undir eina verkætlan, námsætlan, samstarv.

Tað manglar bara, at vit fara í gongd.

Eisini ynski eg at arbeiða fyri:

At gera felags niðurstøður av okkara arbeiði á teimum ymisku økjunum.

Hetta skal gerast við skeiðvirksemi og evnisdøgum.

Niðurstøðurnar skulu gerast sjónligar í okkara blað, í faldarum og teldutøkar á okkara heimasíðu. Blað, serútgávur og heimasíða skal gerast til ein felags plattform, sum hongur saman, og sum skal oysa kunning út um okkara virksemi og gera okkum tilvitað um okkara fak.

Hetta ger, at hvør einstakur limur gerst meira tilvitaður um sítt egna fak á øllum økjum á frítíðarskúlum, serøkinum, dagstovnum, skúlaøkinum.

Tað er alneyðugt at fáa á skrift, hvat okkara fak er. Á hendan hátt er lættari at orða seg, tá vit kunna greiða frá í orðum, hvat tað er, vit gera. Vit hava ofta torført við at seta orð á tað, vit fáast við. Vit eru farin í gongd tey síðstu árini, og enn manglar at síggja meira á skrift, at síggja fleiri av okkara í almennum kjakinum, í nevndum, har avgerðir verða tiknar, og sum undirvísarar.

## Okkara fakliga vitan skal út

Tað sita nógvir limir hjá Føroya Pedagogfelag, sum hava arbeitt á teimum ymisku økjunum í nógv ár. Tey sita inni við einari serligari vitan um okkara fak. Tó er tað ikki ofta, at tú sært ein av okkara undirvísa í okkara egna faki ella í einum faki hjá øðrum fakbólkum. Hví er hetta so? Er tað, tí vit ikki halda okkum fram at. Ofta eru tað onnur, ið halda seg framat at greiða okkum frá um okkara egna fak; hetta er eisini fínt, og tað hevði verið frískligt og gott fyri sjálvvirðið við einum av okkara, ið greiddi frá tí námsfrøðiliga arbeiðinum.

Eg sakni eisini at síggja og hoyra teir námsfrøðingar, sum hava nomið sær hægri útbúgving, teir sita eisini inni við síni servitan, sum vit eru forvitin eftir at hoyra um.

Vit hava ásetingar í sáttmálanum, sum gevur okkum rætt til undirvísingarløn.

Tað byrjar við okkum sjálvum, vit duga eisini at undirvísa á ráðleggingardøgum, foreldrafundum, stovu- og starvsfólkafundum. Tað er bara vit sjálv, ið eru forðingin.

Lat okkum halda okkum framat, vit vita, hvat námsfrøði er.



# Líkasælir myndugleikar

Orð: Tórfinn Smith

Jórun Ennistíg hevur verið nevndarlimur síðani í januar 2008. Hon hevur nú gjørt av at gevast og stillar tí ikki uppaftur, nú aðalfundurin verður 14. apríl. Tað er kortini ikki, tí at hon heldur, at rokkið er á mál við teimum aðalmálum, hon setti sær, tá hon kom í nevndina. Treyðugt so, ávís mál eru framd, og okkurt er komið væl áleiðis, men hon ásannar, at almennu myndugleikarnir eru tungir at dansa við. Eftir drúgva tíð eydnaðist at fáa gott samband við Helenu Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýriskvinnu við mentamálum, men sama kann hon ikki siga um núverandi landsstýrismannin, sum ikki tykist at hava nakran sum helst áhuga fyri hesum øki. Jórun sigur, at hóast nevndin ikki hevur sett seg í samband við landsstýrismannin, heldur hon tað ikki vera ov mikið at rokna við, at landsstýrismaðurin sýndi hesum øki, sum er hansara størsta málsøki, størri ans. Tað tykist, sum myndugleikin liggur so fjart frá okkum, sigur Jórun.

Jórun arbeiðir sum hjálparfólk, og tí lá eisini nær hjá henni at arbeiða fyri, at hjálparfólk fingu eina betri eftirløn. Nevndin hevur arbeitt nógv við eftirlønarspurningum, sum eisini hava verið frammi í sambandi við sáttmálasamráðingar, uttan at nakað er komið burturúr. Millum onnur mál, sum Jórun hevur lagt serligan dent á, er at menna álitisfólkabólkarnar, harundir at fáa gjørt eina sonevnda álitisfólkamappu. Tað arbeiðið hevur drigið út leingi, men er nú rættiliga komið undir land, og hetta verður eitt gott amboð hjá álitisfólkunum. Jórun sigur, at tey hava gjørt sær stóran ómak at fáa hetta arbeiðið so fullfíggjað sum gjørligt, og tá arbeiðið verður gjørt av leikfólki í teirra frítíð, tekur tað tíð.

-Arbeiðið í nevndini hevur verið sera áhugavert og spennandi, og eg fari tí eisini at sakna tað, sigur Jórun Ennistíg, sum takkar nevnd, limum og samstarvsfólki annars fyri góðan stuðul hesi árini, hon hevur verið nevndarlimur.



# Jannie fyri Jórun

*Eftir aðalfundin 14. apríl er Jórun Ennistíg ikki longur nevndarlimur í Pedagogfelagnum. Í hennara stað kemur Jannie S. Jacobsen.*

Orð: Tórfinn Smith

Jannie er 36 ára gomul og hevur starvast sum hjálparfólk í føstum starvi í Býlingshúsinum millum Gilja við námsfrøðiligari ábyrgd síðani 2004. Hon hevur verið álitisfólk síðani 2007. Jannie er í løtuni varalimur til nevndina, men eftir aðalfundin verður hon fastur nevndarlimur. Lóg felagsins sigur, at í minsta lagi skal ein av nevndarlimunum vera hjálparfólk. Í verandi nevnd er Jórun Ennistíg einasta hjálparfólk i nevndini, og nú hon ikki ynskir at halda fram, kemur Jannie í hennara stað, uttan at neyðugt er við atkvøðugreiðslu.

Tá Jannie í fjør læt seg stilla upp til nevndina, gjørdi hon vart við nøkur sjónar og nøkur mál, sum hon hevði serligan áhuga í at arbeiða fyri. Millum hesi nevndi hon, at hjálparfólk á dagstovnum hava als ikki nóg góðar sømdir viðvíkjandi fyrireiking, eftirmeting, foreldrasamrøðum v.m. Hetta helt hon vera viðurskifti, sum eru við til at lækka støðið á tí arbeiði, sum tey fáa løn fyri at útinna. Harafturat skrivaði Jannie, at hjálparfólk, við ella uttan námsfrøðiliga ábyrgd, hava ikki fyrireikingartímar íroknaðar í sín sáttmála eins og útbúnir námsfrøðingar hóast alt hava. Hetta er nú komið upp á pláss við nýggja sáttmálanum, og tað fegnast Jannie um. Men enn eru mong mál, ikki minst hjá hjálparfólkum, at stríðast fyri. Jannie saknar enn eina grundútbúgving fyri hjálparfólk, sum hon eisini segði seg vilja arbeiða fyri.

– Jú, víst hava vit fingið ein møguleika fyri, at hjálparfólk, sum ikki hava nakra miðnámsútbúgving, kunnu nema sær eina pedagogútbúgving. Treytin er tó, at hesi hava í minsta lagi fimm ára starvsroyndir. Men her er ikki talan um eina grundútbúgving, sum ynskiligt hevði verið.

Jannie heldur, at hjálparfólk hava meira ella minni lyndi til at standa í skugganum av útbúnum pedagogum, og tí heldur hon, at hjálparfólkum eigur at standa í boði eitt nú fakliga mennandi skeið, soleiðis at tey fara at kenna seg enn betur í dagliga arbeiðinum. Sjálv arbeiðir Jannie sum hjálparfólk, og tí heldur hon tað vera heilt natúrligt hjá sær at gera sítt til at hjálpa og vegleiða hendan partin av starvsfólkunum.

– Hava hjálparfólk hugskot, trupulleikar ella hvat tað kann vera, so eru tey meira enn vælkomin at venda sær til mín, sigur Jannie S. Jacobsen, sum brátt verður ein partur av nevndini í Pedagogfelagnum.

# Limirnir gjørdu eitt framúr gott arbeiði

*-Eg eri sera stolt av at vera forkvinna í hesum felag, tá eg hugsi um tey kreativu evnini og hugskotini hjá okkara álitisfólkum. Tey valdu at síggja møguleikar heldur enn forðingar, tí tað var sera avgerandi hjá okkum øllum at fáa fólk flest at skilja okkara sjónarmið, sigur forkvinnan í Pedagogfelagnum*

Orð: Tórfinn Smith

Tað var við góðum treysti, at Pedagogfelagið saman við hinum trimum feløgunum í fakfelagssamstarvinum, Starvsmannafelagnum, Lærarafelagnum og Havnar Arbeiðskvinnufelag, longu í juni mánaði fór undir felagssamráðingar við sínar arbeiðsgevarar, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Ósiðinum við ikki at hava fingið nýggjan sáttmála, samstundis sum tann gamli sáttmálin gongur út, vildu fakfeløgini hesaferð sleppa undan.

Maud Wang Hansen, forkvinna í Pedagogfelagnum, greiðir frá gongdini í samráðingunum frá byrjan, hvussu landsstýrisskiftið seinkaði og broytti mannagongdir, tá stígur kom í samráðingarnar, og boð varð eftir semingsfólki, um miseydnaðar semingsroyndir, og at enda verkfalli.

## Felagssamráðingar

– Felagssamráðingarnar vóru skipaðar soleiðis, at formenninir í fakfelagssamtakinum samráddust við arbeiðsgevararnar um nøkur yvirskipað viðurskifti. M.a. um at fáa ásettan ein lønarkarm og eftirlønarspurningar. Harafturat vóru onnur yvirskipað mál sum rúmligi arbeiðsmarknaðurin og førleikamenning. Okkara ætlan var, at vit soleiðis fingu ein karm ásettan; og síðani kundi verða farið undir samráðingar um serkrøv, og tá vistu vit, hvat útgangsstøðið hjá hvørjum øðrum var. Síðani var ætlanin, at feløgini hvørt sær kundu fara undir samráðingar um serkrøv í august. Felagssamráðingarnar drógu út, tí lønarkarmurin, sum landsstýrið vildi bjóða, var sera lítil og samsvaraði als ikki við tað lyfti, sum fyrrverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, gav okkum í sambandi við undanfarna sáttmálan við einum prosenti í lønarhækkan. Næstu ferð skuldu vit fáa ein munandi frægari sáttmála, varð sagt. Men hetta lyftið varð brotið, og nú stóð okkum í boði 1,2 prosent, og tað hildu vit vera alt ov lítið, men samráðingarnar hildu fram.

## Sersamráðingar

– Hóast felagssamráðingarnar ikki vóru lidnar, sum vit annars høvdu vónað, fóru vit í august undir at samráðast um serkrøv. Vit høvdu einar fýra ella fimm fundir við Fíggjarmálaráðið og KAF, men her komu vit heldur ongan veg. Vit møttu bert ringum vilja, og á seinasta fundinum gjørdu arbeiðsgevararnir okkum greitt, at teir vildu ikki góðtaka nakað av okkara serkrøvum. Vit valdu tá at gevast við samráðingunum, tí hesar bóru onga leið, og boðaðu arbeiðsgevarunum frá, at teir skuldu frætta aftur frá okkum fyri 1. oktober. Vit vónaðu, at felagssamráðingarnar tá vóru komnar á mál, tí vit vildu ikki fara út um 1. oktober, uttan at nakar nýggjur sáttmáli var undirskrivaður.

## Nýggir tónar

27. september skrivaði løgmaður út nýval til løgtingið, og nú var støðan ein onnur í sambandi við samráðingar um nýggjar sáttmálar. Maud Wang Hansen sigur, at samráðingarnar vórðu nú settar á standby, sum hon tekur til.

– Vit royndu í felagssamráðingunum kortini at tryggja okkum, at vit kundu halda fram við støði í tí, sum vit vóru komin fram til við undanfarna landsstýri. Frá samráðingarleiðaranum hjá Lønardeildini fingu vit eisini at vita, at tað vildi verið tann vanligi mátin at hildin fram. Men vit fingu annað at síggja. Nýggi fíggjarmálaráðharrin valdi ta heilt óvanligu mannagongdina og sópaði alt av borðinum og broytti allar grundleggjandi reglur.

## Lurtaði ikki

Nýggj samgonga varð skipað 14. november, og 12. desember varð aftur farið til samráðingarborðið til felagssamráðingar við nýggja fíggjarmálaráðharran, sum greiddi frá nýggja skattapolitikkinum og broytingunum í skattingini av pensiónini, greiðir Maud frá. Hon varnaðist tó skjótt, at hesin ikki hevði



Mynd: Alan Brockie

fatan av, hvat hetta var fyri ein samfelagsbólkur, sum hann samráddist við.

– Vit máttu bara ásanna, at stórt sæð eingin av okkara limum fekk nakran ágóða av flatskattinum, og harafturat mistu okkara limir við skipanini at skatta pensiónirnar við 40 prosentum. Hetta royndu vit at greiða fíggjarmálaráðaharranum frá, men einki rein við. Hann vildi eisini sjálvur sleppa at gera mun á, hvørjar inntøkur hvør lønarbólkur skuldi fáa, og tað stóð ikki til at broyta.

## Hertak Vaglið

Hesar nýggju politisku hugsjónirnar við flatskatti og nýggja háttinum at skatta pensiónir var ikki júst tað, sum fakfeløgini kundu hugsað sær, og skipað varð tí fyri stórum mótmælistiltaki á Vaglinum undir herrópinum „Hertak Vaglið", har eisini eitt av herrópunum var: Fingrarnar vekk frá okkara pensjón. Mótmælisdagurin varð ásettur til 4. desember á Vaglinum, har nógv fólk úr øllum samfelagsbólkum úr øllum Føroyum møttu og við røðum, sangi og tónleiki vildu gera vart við síni sjónarmið. Maud sigur, at alt tóktist at tala fyri deyvum oyrum, hóast fakfeløgini royndu at tala fyri síni søk. Seinasta vón um semju sloknaði hin 21. desember, tá fakfelagssamtakið aftur fór til samráðingarborðið.

– Tann dagin máttu vit tíverri ásanna, at har var als einki at samráðast um, og tí boðaðu vit frá, at nú vildu vit ikki samráðast meir á tílíkan hátt, sigur Maud sum ásannar, at talan var í veruleikanum ongantíð um veruligar samráðingar. Fíggjarmálaráðharrin gjørdi okkum greitt, hvat hann vildi, so soleiðis skuldi tað bara verða. Samstundis kundu vit ásanna, at tann frælsi samráðingarrætturin, sum annars er grundarsteinurin í fólkaræðinum og norðurlendsku vælferðarskipanini, ikki taldi her.

– Beint eftir, at slitið í samráðingunum var veruleiki, fóru vit beinleiðis í og kring løgtingið at gera vart við okkum. Har bleiv rópt, sungið og larmað við karamellblikkum, men hetta var alt sum at sletta vatn á gás, sigur Maud, sum eisini tollaksmessudag sat á tingsins áhoyraraplássi og vónaði, at enn mundi samvitska vera í føroyskum politikki, men mátti kortini ásanna, at so var ikki. Hon heldur, at hendan dagin avreiddi tingmeirilutin okkara samhaldsfasta vælferðarsamfelag.

## Semingsmenn koma upp í leikin

Stutt frammanundan, at tey fýra fakfeløgini í samstarvi slitu samráðingarnar við sínar arbeiðsgevarar, hevði Maskinmeistarafelagið gjørt tað sama, og teir vóru farnir at leita eftir semingsfólki.

– Tá heitti landsstýrið hálvavegna á okkum um at bíða við okkara seming, til Maskinmeistararnir vóru lidnir, men tað vildu vit ikki. Vit høvdu slitið samráðingarnar og vildu nú hava semingsfólk upp í leikin, tí nú var meira enn nóg mikið av tíð farin. Vit samdust so um at heita á Petur Joensen, sum fekk sær Petur Zachariasen afturat sær. Eftir hetta hittu teir partarnar fyri at kunna seg um tey ymisku felags- og serkrøvini, og 20. januar løgdu semingsmenninir fram fyri partarnar leistin fyri, hvussu semingin skuldi fara fram.

Dagin eftir, 21. januar, hittust so allir partar uppi á Hotel Føroyum í eini roynd at finna eina semju, bæði um felags- og serkrøv. Maud sigur, at tey vildu ikki endurtaka upplivingarnar frá samráðingunum í 2010, tá tey ongantíð komu til at tosa um serkrøv, sum hava avbera stóran týdning fyri feløgini.

– Vit vóru nakrar dagar á Hotel Føroyum, men fluttu so, av onkrari óforkláriligari orsøk á Hafnia. Eftir eitt samdøgur har fluttu vit so í Móttøkuhúsið hjá Tórshavnar kommunu, har eitt semingsuppskot kom á borðið fimta dagin eftir, at semingsroyndin byrjaði. Semingsmenninir høvdu tá gingið millum partarnar, og vit kendu okkum rímiliga trygg við, at semingsmenninir høvdu skilt okkara høvuðskrøv, sum vit eisini fyri ein part høvdu orðað saman við semingsmonnunum.

## Tað eina skotið í byrsuni

– Semingsmenninir høvdu frammanundan gjørt greitt, at teir høvdu bert hitt eina skotið í byrsuni. Nú var so spurningurin, hvønn teir ætlaðu at skjóta. Tað vísti seg, at tað var okkum, tí tá vit sóu semingsuppskotið, var ikki eitt einasta av okkara serkrøvum tikið við. Hetta gjørdi eg vart við beinanvegin,

*"Sjálvandi eiga lønarsamráðingar ikki at tengjast at førda politikkinum. Fólk eiga rætt til løn fyri sítt arbeiðið og somuleiðis rætt til góð og tíðarhóskandi arbeiðsviðurskifti. Hetta er tað, samráðingar snúgva seg um"*











*Myndir: Ole Valle*

og semingsmenninir ásannaðu eisini, at her var ein feilur komin í. Eg bað um at fáa hetta rættað, og vit fóru hvør til sín, greiðir Maud frá og leggur dent á, at í eini seming eru tað bert semingsmenninir, sum eiga semingsuppskotið, og sum teir einastu kunnu teir eisini gera tær broytingar, sum teir vilja.

– Tað gjørdu teir tó ikki, men fóru beinleiðis til arbeiðsgevararnar við uppskotinum. Arbeiðsgevararnir gjørdu greitt, at skuldu teir góðtaka uppskotið, skuldi einki broytast. Hinvegin gjørdu vit greitt, at fingu vit ikki okkara serkrøv við, kundu vit ikki góðtaka uppskotið. Vildu arbeiðsgevararnir slíta samráðingarnar, so var tað upp til teir, men so hendi tað heilt margháttliga, at partarnir vóru hesa náttina settir at samráðast av nýggjum um okkara serkrøv. Heldur enn at tosa um okkara aðalmál, sum m.a. vóru fyrireikingartíðin og starvsskipanin, vildu arbeiðsgevarar tosa um heilt onnur viðurskifti, sum teir hildu seg kunnu bjóða okkum. Við øðrum orðum vildu teir siga, hvat var best fyri okkum, og ikki lurta eftir, hvat vit sjálv vildu. Eftir hetta kom eitt nýtt semingsuppskot á borðið – uttan fyrireikingartíð – og tá varð avtalað, at vit skuldu hittast aftur dagin eftir. Nú varð vígvøllurin fluttur í Kaffihúsið í Vágsbotni. Feilurin var enn ikki rættaður, og enn var eingin orðing um fyrireikingartíð komin við, og øll feløgini gjørdu greitt, at tey vildu ikki góðtaka uppskotið, og partarnir fóru eina ferð enn hvør til sín eftir at hava vrakað semingsuppskotið.

Eftir hetta vendu øll fýra feløgini sær aftur til Fíggjarmálaráðið og gjørdu greitt, at um onkur ávís orðing kom við, kundi semingsuppskotið góðtakast. Dagin eftir fekk hvørt av teimum fýra feløgunum skriv frá Fíggjarmálaráðnum, har sagt varð, at nøkur grundleggjandi mál vóru í krøvunum frá fakfeløgunum, sum tað ikki kundi góðtaka. Annars kundi Fíggjarmálaráðið góðtaka semingsuppskotið.

## Trý gjørdu semju

Forkvinnan í Pedagogfelagnum greiðir frá, at hóast hvørt felag sær hevði fingið skriv frá Fíggjarmálaráðnum, varð lagt upp til, at øll fýra feløgini samstundis skuldu hitta arbeiðsgevararnar, men so bleiv kortini ikki. Trý av feløgunum valdu heldur at gera semja við Fíggjarmálaráðið.

– Nevndin í Pedagogfelagnum tók ta avgerð ikki at fara á fund við Fíggjarmálaráðið, men at kalla øll álitisfólk okkara til fundar, har niðurstøðan varð, at einki annað var at gera enn at fara í verkfall; og tað byrjaði týsmorgunin 31. januar kl. 7 á morgni.

## Verkfall, ein álvarsom avgerð

– Eg eri fullgreið yvir, at avgerðin at fara í verkfall er sera álvarsom. Hetta er ein stór avgerð, men vit sóu okkum ongan annan møguleika hava. Vit vildu gera púra greitt, at vit kravdu, at tann frælsi samráðingarrætturin verður virdur. Á álitisfólkafundinum, har 120 álitisfólk møttu, gjørdist púra greitt, hvat tey hildu, og sostatt var ikki talan um, at tað var nevndin, sum koyrdi limirnar út í eitt verkfall, men her var nevndin, sum stuðlaði limunum í einum verkfalli, sigur Maud, sum ásannar, at hon svav illa hesa náttina. Hugsaði um, hvussu var at halda skil á so mongum limum í verkfalli, hvørjar avleiðingar hetta mundi fara at fáa, og hvussu tey skuldu leggja til rættis tiltøk at gera vart við seg. Tað var eisini neyðugt hvønn dag at skráseta allar limirnar, sum savnaðust kring landið, tí lóg felagsins sigur, at skal ein limur fáa part av endurgjaldi fyri mista løn, er tað ein treyt, at viðkomandi er virkin í tiltøkunum.

Álitisfólk kring landið fingu ábyrgdina av at finna hóskandi høli, har limirnir

*“Vit megnaðu at basa differentieringini fyri teir flestu av okkara limum. Tó máttu vit ásanna, at nýggi fíggjarpolitikkurin hevði etið seg heilt inn á samráðingarborðið. Hetta er eitt sera álvarsamt álop á fakfelagsrørsluna og á tann frælsa samráðingarrættin”*





kundu skrásetast og savnast. Harafturat fingu álitisfólkini ábyrgdina av at skipa fyri tiltøkum av alskyns slag. Forkvinnan í Pedagogfelagnum er sera nøgd við, hvussu ágrýtin álitisfólkini fóru til verka og somuleiðis flestallir limir felagsins við.

– Eg eri ikki sørt stolt av at vera forkvinna í hesum felag, tá eg hugsi um tey kreativu evnini og hugskotini hjá okkara álitisfólkum. Tey valdu at síggja møguleikar heldur enn forðingar og fingu harvið limirnar at luttaka í verkfallinum av fullum hjarta, tí tað var sera avgerandi hjá okkum øllum at fáa fólk flest at skilja okkara sjónarmið. Vit kunnu ikki krevja av fólki, at øll skilja týdningin av okkara krøvum, eitt nú í sambandi við fyrireikingartíð. Tað hevur ongantíð verið so, at eitt fakfelag kann fáa alt Føroya fólk at skilja síni serkrøv, so fólk kunnu meta um, hvørt krøvini eru rímilig ella minni rímilig, sigur Maud, sum kortini heldur, at fólk fingu eyguni upp fyri, hvussu pedagogar arbeiða, og hvørjar umstøður teir hava.

– Vit fingu gjørt greitt, at her er ikki bert talan um ansing, men fingu ávirkað hugburðin soleiðis, at fólk skilja, at talan er um, at vit hava fakliga ábyrgd, og at vit dagliga gera eitt professionelt arbeiði, sum er gjølla umhugsað, og sum tí eisini krevur fyrireikingartíð. At tiltøkini fóru fram á tann hátt, tey gjørdu, var eisini við til, at fólk tóku undir við okkum, heldur Maud.

– Hvussu drúgt eitt verkfall fer at verða, veit eingin frammanundan, men eftir at fyrsta vikan var farin, og avleiðingarnar merktust av álvara, hevði eg roknað við, at okkurt fór at henda. Men arbeiðsgevarin lat bara standa til. Tað vísir seg, at borgarin í landinum klárar at liva undir ótrúliga stórum trýsti og ágangi, uttan at politiski myndugleikin ger nakað við tað. Helst vitandi um, at verkfallið darvaði meira tann einstaka borgaran heldur enn ta politisku skipanina, heldur forkvinnan í Pedagogfelagnum.

## Ikki nóg mikið at klippa hjørtu

– Tá verkfallið kom inn í triðju vikuna, vóru fleiri av okkara limum, sum fóru at gera vart við seg. Nú varð spurningurin settur við, hvussu leingi vit bert skulu syngja og klippa hjørtu, her mátti annað til. Røðurnar gjørdust harðligari, fólk møttu upp uttan fyri Fíggjarmálaráðið og vundu sjórænaraflagg á stong, og limirnir gingu kring landið og gjørdu vart við seg. Jú, limirnir fyltu nógv upp í landslagnum, uttan tó at nakar harðskapur spurdist úr. Tað var ikki nevndin, sum stýrdi tiltøkunum kring landið, men saman við álitisfólkunum løgdu vit øllum eina við, at alt skuldi fara fram innan fyri lóg og rætt.

So hvørt sum verkfalsdagarnir gingu, og einki røktist fyri semju, vóru nógvar ábendingar um, at tiltøkini máttu herðast, m.a. við at taka undantaksloyvi aftur.

– Sjálv haldi eg, at vit høvdu rakt teir veikastu borgararnar nóg mikið, men sum fakfelagsfólk í einum stríði við arbeiðsgevararnar, mást tú hugsa øðrvísi, og tí varð avgerð tikin um at leggja størst møguligt trýst á politiska myndugleikan fyri at gera honum greitt, at nú er tað teirra uppgáva og ábyrgd. Tí tóku vit fleiri av undantaksloyvunum aftur, uttan tó at nakað óforsvarligt skuldi fara fram. Tá vísti seg at hjálpa, og vit vóru biðin um at koma til samráðingarborðið í Fíggjarmálaráðnum, har loksins ein semja varð undirskrivað, greiðir forkvinnan í Pedagogfelagnum frá.









København 30.01.2012

# Støtteerklæring til Føroya Pedagogfelag

Nordisk Forum For Socialpædagoger – NFFS – har fulgt udviklingen og situationen i lønforhandlingerne for vores søsterorganisation Føroya Pedagogfelag. Vi er dybt bekymrede over den drejning, lønforhandlingerne har taget. NFFS, der består af de faglige organisationer for socialpædagoger i Norge, Sverige, Danmark, Island, Grønland og Færøerne, tager skarpt afstand fra, at man blander løn- og skattepolitik sammen. Det er upassende, at den færøske regering således blander sig i forhandlingerne mellem arbejdsmarkedets parter. Vi giver vores uforbeholdne støtte til Føroya Pedagogfelag i kampen for en rimelig løn til deres medlemmer, og for at bevare aftalemodellen.

Netop den kollektive aftalemodel, som vi bruger i Norden, er baseret på, at der er tale om anerkendte partnere, der forhandler på lige vilkår. Med den færøske regerings sammenblanding af løn- og skattepolitik og dermed indblanding i forhandlingerne, er aftalesystemet reelt sat ud af kraft. Dette er vi i NFFS stærkt oprørte over, da det kan have langsigtede og utilsigtede konsekvenser for arbejdstagerne og deres rettigheder – herunder retten til at forhandle løn med arbejdsgiver som lige og jævnbyrdige parter.

NFFS støtter fuldt og helt Føroya Pedagogfelag i denne konflikt og håber, at der snarligt må komme en løsning, der er i overensstemmelse med brugen af det nordiske kollektive aftalesystem.

På vegne af NFFS
Benny Andersen, formand
Socialpædagogernes Landsforbund, Danmark

Helsingfors 30.01.2012

# Uttalande från Nordiska Lärarorganisationers Samråd om löneförhandlingarna för de offentligt anställda på Färöarna.

NLS har idag fått information från våra systerorganisationer Føroya Pedagogfelag och Føroya Lærarafelag om den aktuella situationen i löneförhandlingarna för de offentliganställda på Färöarna. Nordiska Lärarorganisationers Samråd NLS, som representerar 18 lärar- och förskolelärarorganisationer med över 600.000 medlemmar i Danmark, Finland, Island, Norge, Sverige, Grönland och Färöarna, vill med detta uttalande ge uttryck för vår oro inför den statliga inblandningen i förhandlingarna och vårt stöd till Føroya Pedagogfelag i deras rättmätiga kamp för rimliga löne- och anställningsvillkor och för den fria förhandlingsrätten.

Den nordiska kollektivavtalsmodellen förutsätter att arbetsmarknadsparterna utan inblandning förhandlar på jämbördiga villkor för att uppnå ett avtal som tillfredsställer alla parter. Arbetsmarknadens reglering genom kollektivavtal bidrar till fredliga lösningar och skapar öppenhet för gemensamma resultat också i svåra lägen. För oss är det stötande att i en avtalsrörelse blanda in skattepolitiken. Skattesänkningar, eller skattehöjningar, har ingenting med löneutrymmet att göra. Det vore att öppna för statlig lönepolitik. Ingen part har rätt till att påtvinga annan part lösning utan utgångspunkten skall vara äkta, förutsättningslösa förhandlingar på jämbördig bas.

Vi hoppas och tror på att uppkomna problem gällande löneomgången på Färöarna kan lösas genom förhandlingar enligt nordisk, vedertagen kollektivavtalsmodell.

Nordiska Lärarorganisationers Samråd
Anders Rusk
Generalsekterare

# Fingu staðfest fyrireikingartíðina og bastu differentieringini

21. Februar skrivaðu Føroya Pedagogfelag og arbeiðsgevararnir undir nýggjan 2-ára sáttmála. Felagið metir sáttmálan at vera ein sigur fyri pedagogiska fakið.

Vit settu upprunaliga fram krav um, at í sáttmálanum fyri dagstovnaøkið skuldi ásetast, at tíð skuldi setast av til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið.

Hetta hava arbeiðsgevararnir alla tíðina sagt vera ómøguligt, tí hetta kundi sambært teimum ikki setast í sáttmálan. Sagt varð, at hetta var ikki sáttmálastoff.

Okkum hevur hinvegin staðið í boði at fáa sett ein arbeiðsbólk, sum kundi viðgera spurningin um fyrireiking og lýsa støðuna á økinum. Vit hava nú gjørt semju, sum ásetir, at hjá øllum starvsfólkum á dagstovnunum skal tíð setast av til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið.

Í nýggju ásetingini er ongin avmarking um, hvussu nógv tíð skal setast av til hetta arbeiðið. Hetta verður sjálvandi nakað, sum leiðsla og starvsfólk fara at gera av eftir tørvi hjá hvørjum einstøkum.

Føroya Pedagogfelag fegnast serstakliga nógv um, at ongin avmarking er sett í sáttmálan um, hvussu nógv tíð skal brúkast til fyrireiking og eftirmeting.

Formaðurin í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum hevur alment váttað, at brúkast skal tann tíð til fyreiking, sum er neyðug. Hetta fata vit sum eitt stórt frambrot, hvat virðingini fyri okkara faki viðvíkur.

Vit halda, at vit við verkfallinum fluttu arbeiðsgevararnar langt frá útgangsstøðinum, sum var, at ein arbeiðsbólkur skuldi tosa víðari um tað, vit nú hava fingið í sáttmálan.

Hvat viðvíkur løn, er ásett, at differentieringin í lønarhækkingini byrjar við 32.000 kr. Hetta merkir, at einans fáir limir í felagnum verða fyri eini evarska lítlari differentiering. Differentieringin kann tí sigast at vera fingin burtur.

Føroya Pedagogfelag takkar øllum limunum fyri tað megnar tak, teir hava tikið, meðan verkfallið hevur verið, og takkar somuleiðis fyri tann ovurstóra samhuga, felagnum er vístur.

*Føroya Pedagogfelag*

# Semja millum øðrumegin Føroya Pedagogfelag og hinumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Verandi sáttmálar verða framlongdir til tann 1. oktober í 2013.

Lønirnar verða sum í hjáløgdu lønartalvum.

Orðið „sambúgvi“ verður sett inn í grein 17, stk. 3 í pedagogsáttmálanum og grein 9, stk. 1 í hjálparfólkasáttmálanum.

Frá 1. apríl 2012 verða 12% av gjøldunum fyri ólagaliga arbeiðstíð goldin í frítíðarløn. Frítíðarárið 2. mai 2012 til 1. mai 2013 verður viðgjørt sum frammanundan. Frá 2. mai 2013 fáa pedagogar ikki gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð í frítíðini, men fáa í staðin 12% útgoldið 2. mai.

§ 15, stk. 2 í sáttmálanum fyri pedagogar verður soljóðandi : „Stk. 2. Tey, ið eru sett eftir hesum sáttmála, eiga rætt til serstakt frítíðarískoyti svarandi til 1,5% av allari árslønini í undanfarna innvinningarárinum og 12% av útgoldnari yvirtíðarløn. Frá 1. apríl 2012 verða 12% í frítíðarløn av gjøldum fyri **ólagaliga** arbeiðstíð goldin í grunn.“

Í sáttmálanum fyri hjálparfólk kemur inn nýtt stk. 4 í § 11: „Frá 1. apríl 2012 verða 12% í frítíðarløn av gjøldum fyri ólagaliga arbeiðstíð goldin í grunn.“

Í avtaluni fyri tænastumannasettar pedagogar kemur inn nýtt stk. 2 í § 9: „Frá 1. apríl 2012 verða 12% í frítíðarløn av gjøldum fyri ólagaliga arbeiðstíð goldin í grunn.“

§ 10 Tíð til annað arbeiði *verður orðað soleiðis:*

Hjá pedagogum og hjálparfólki á dagstovnum skal tíð setast av til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið.

Stk. 2: Hjá pedagogum á dagstovnum kann ein tími í miðal um vikuna brúkast til at fyrireika pedagogiska arbeiðið. Leiðarin á stovninum hevur ábyrgd av tilrættaleggingini av hesum arbeiðinum. Viðvíkjandi foreldrafundum og starvsfólkafundum verður skipanin sum higartil.

*Á Argjum tann 21.2.2012*

Føroya Pedagogfelag

Fíggjarmálaráðið
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

## Føroya Pedagogfelag

**Lønartalva pr. 1. okt. 2011**

**Sáttmálasett**

| Starvsbólkur | Lønarstig |
|---|---|
| Hjálparfólk | 1, 2, 3, 4, 5, 6, 7 |
| Hjálparfólk á bústovnum | 3, 4, 5, 6, 7, 8 |
| Hjálparfólk við ped. ábyrgd | 6, 7, 8, 9 |
| Pedagogar á dagstovnum | 11, 12, 13, 14, 15, 16, 17, 18 |
| Pedagogar á bústovnum | 11, 12, 13, 14, 15, 16, 17, 18, 19 |
| Dagrøktarl. uttan utb. 0 -174 | 11, 13, 15 |
| Dagrøktarl. uttan utb. 175 - | 12, 14, 16 |
| Varaleiðari bústovnar | 17, 19, 21, 23 |
| Leið. dagst. 0 - 79 | 20, 22, 24, 26 |
| Leið. dagst 80 - 119 | 22, 24, 26, 28 |
| Leið. dagst 120 - 174 | 24, 26, 28, 30 |
| Leið. dagst. 175 - 290 | 26, 28, 30, 32 |
| Leið.Bús.smá | 24, 26, 28, 29 |
| Leiðari búst. stórir | 25, 27, 29, 30 |
| Leið. búst. størstu | 27, 29, 31, 33 |

| Sáttmála-skala | | Tímaløn |
|---|---|---|
| 1 | 18.676,35 | 107,75 |
| 2 | 19.146,18 | 110,46 |
| 3 | 19.617,21 | 113,18 |
| 4 | 20.088,25 | 115,89 |
| 5 | 20.559,28 | 118,61 |
| 6 | 21.030,31 | 121,33 |
| 7 | 21.500,15 | 124,04 |
| 8 | 21.971,18 | 126,76 |
| 9 | 22.442,21 | 129,47 |
| 10 | 22.913,25 | 132,19 |
| 11 | 23.384,28 | 134,91 |
| 12 | 23.855,31 | 137,63 |
| 13 | 24.325,15 | 140,34 |
| 14 | 24.796,18 | 143,05 |
| 15 | 25.267,21 | 145,77 |
| 16 | 25.738,25 | 148,49 |
| 17 | 26.209,28 | 151,21 |
| 18 | 26.679,12 | 153,92 |
| 19 | 27.150,15 | 156,64 |
| 20 | 27.621,18 | 159,35 |
| 21 | 28.092,21 | 162,07 |
| 22 | 28.563,25 | 164,79 |
| 23 | 29.034,28 | 167,51 |
| 24 | 29.504,12 | 170,22 |
| 25 | 29.975,15 | 172,93 |
| 26 | 30.446,18 | 175,65 |
| 27 | 30.905,26 | 178,30 |
| 28 | 31.388,25 | 181,09 |
| 29 | 31.858,08 | 183,80 |
| 30 | 32.327,78 | 186,51 |
| 31 | 32.793,06 | 189,19 |
| 32 | 33.258,33 | 191,87 |
| 33 | 33.723,61 | 194,56 |
| 34 | 34.188,88 | 197,24 |
| 35 | 34.652,98 | 199,92 |
| 36 | 35.117,69 | 202,60 |
| 37 | 35.582,41 | 205,28 |
| 38 | 36.047,13 | 207,96 |
| 39 | 36.511,84 | 210,65 |
| 40 | 36.976,56 | 213,33 |
| 41 | 37.441,27 | 216,01 |
| 42 | 37.908,83 | 218,70 |
| 43 | 38.374,00 | 221,39 |
| 44 | 38.839,28 | 224,07 |
| 45 | 39.304,55 | 226,76 |
| 46 | 39.769,83 | 229,44 |
| 47 | 40.235,10 | 232,13 |
| 48 | 40.700,38 | 234,81 |
| 49 | 41.165,65 | 237,49 |
| 50 | 41.630,93 | 240,18 |
| 51 | 42.096,20 | 242,86 |
| 52 | 42.561,47 | 245,55 |
| 53 | 43.026,75 | 248,23 |

**Tímalønir = mánaðarløn x 12 : 2080**

Varaleiðarar á dagstovnum 0 - 79, + 1 lønarstig

Varaleiðarar á dagstovnum 80 - 119, + 2 lønarstig

Varaleiðarar á dagstovnum 120 -, + 3 lønarstig

# Føroya Pedagogfelag

**Lønartalva pr. 1. okt. 2011**

**Tænastumannasett**

| Pedagogar á serstovnum | Varaleiðari á serstovnum | Leiðari lítil stovnur | Leið. stór. Stovnur | Leiðari størstu stovnum | Tænastu-manna-skala | | Tímaløn |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | 15 | 20.767,37 | 119,81 |
| | | | | | 16 | 21.025,32 | 121,30 |
| | | | | | 17 | 21.298,13 | 122,87 |
| | | | | | 18 | 21.578,07 | 124,49 |
| | | | | | 19 | 21.865,63 | 126,15 |
| | | | | | 20 | 22.161,00 | 127,85 |
| | | | | | 21 | 22.464,25 | 129,60 |
| | | | | | 22 | 22.775,72 | 131,40 |
| | | | | | 23 | 23.095,21 | 133,24 |
| 24 | | | | | 24 | 23.423,49 | 135,14 |
| 25 | | | | | 25 | 23.760,57 | 137,08 |
| | | | | | 26 | 24.106,45 | 139,08 |
| 27 | | | | | 27 | 24.461,87 | 141,13 |
| 28 | | | | | 28 | 24.871,73 | 143,49 |
| | | | | | 29 | 25.201,50 | 145,39 |
| 30 | | | | | 30 | 25.586,12 | 147,61 |
| 31 | | | | | 31 | 25.981,53 | 149,89 |
| 32 | 32 | | | | 32 | 26.387,72 | 152,24 |
| 33 | | | | | 33 | 26.804,30 | 154,64 |
| | 34 | | | | 34 | 27.232,32 | 157,11 |
| | | | | | 35 | 27.671,81 | 159,65 |
| | 36 | | | | 36 | 28.123,48 | 162,25 |
| | | | | | 37 | 28.587,30 | 164,93 |
| | 38 | | | | 38 | 29.063,21 | 167,67 |
| | | 39 | | | 39 | 29.552,68 | 170,50 |
| | | | 40 | | 40 | 30.069,83 | 173,48 |
| | | 41 | | | 41 | 30.570,91 | 176,37 |
| | | | 42 | 42 | 42 | 31.100,80 | 179,43 |
| | | 43 | | | 43 | 31.603,14 | 182,33 |
| | | | 44 | 44 | 44 | 32.204,35 | 185,79 |
| | | | | | 45 | 32.771,33 | 189,07 |
| | | | | 46 | 46 | 33.354,46 | 192,43 |
| | | | | | 47 | 34.560,01 | 199,38 |
| | | | | | 48 | 35.832,44 | 206,73 |
| | | | | | 49 | 37.870,74 | 218,49 |
| | | | | | 50 | 40.856,37 | 235,71 |
| | | | | | 51 | 44.182,77 | 254,90 |
| | | | | | 52 | 46.926,75 | 270,73 |
| | | | | | 53 | 50.959,67 | 294,00 |

**Tímalønir = mánaðarløn x 12 : 2080**

## Føroya Pedagogfelag

**Lønartalva pr. 1. okt. 2012**

**Sáttmálasett**

| Hjálparfólk | Hjálparfólk á bústovnum | Hjálparfólk við ped. ábyrgd | Pedagogar á dagstovnum | Pedagogar á bústovnum | Dagrøktarl. uttan utb. 0 -174 | Dagrøktarl. uttan utb. 175 - | Varaleiðari bústovnar | Leið. dagst. 0 - 79 | Leið. dagst 80 - 119 | Leið. dagst 120 - 174 | Leið. dagst. 175 - 290 | Leið.Bús.smá | Leiðari búst. stórir | Leið. búst. størstu | Sáttmála-skala | | Tímaløn |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | | | | | | | | | | | | | 1 | 18.896,35 | 109,02 |
| 2 | | | | | | | | | | | | | | | 2 | 19.366,18 | 111,73 |
| 3 | 3 | | | | | | | | | | | | | | 3 | 19.837,21 | 114,45 |
| 4 | 4 | | | | | | | | | | | | | | 4 | 20.308,25 | 117,16 |
| 5 | 5 | | | | | | | | | | | | | | 5 | 20.779,28 | 119,88 |
| 6 | 6 | 6 | | | | | | | | | | | | | 6 | 21.250,31 | 122,60 |
| 7 | 7 | 7 | | | | | | | | | | | | | 7 | 21.720,15 | 125,31 |
| | 8 | 8 | | | | | | | | | | | | | 8 | 22.191,18 | 128,03 |
| | | 9 | | | | | | | | | | | | | 9 | 22.662,21 | 130,74 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 10 | 23.133,25 | 133,46 |
| | | | 11 | 11 | 11 | | | | | | | | | | 11 | 23.604,28 | 136,18 |
| | | | 12 | 12 | | 12 | | | | | | | | | 12 | 24.075,31 | 138,90 |
| | | | 13 | 13 | 13 | | | | | | | | | | 13 | 24.545,15 | 141,61 |
| | | | 14 | 14 | | 14 | | | | | | | | | 14 | 25.016,18 | 144,32 |
| | | | 15 | 15 | 15 | | | | | | | | | | 15 | 25.487,21 | 147,04 |
| | | | 16 | 16 | | 16 | | | | | | | | | 16 | 25.958,25 | 149,76 |
| | | | 17 | 17 | | | 17 | | | | | | | | 17 | 26.429,28 | 152,48 |
| | | | 18 | 18 | | | | | | | | | | | 18 | 26.899,12 | 155,19 |
| | | | | 19 | | | 19 | | | | | | | | 19 | 27.370,15 | 157,90 |
| | | | | | | | | 20 | | | | | | | 20 | 27.841,18 | 160,62 |
| | | | | | | | 21 | | | | | | | | 21 | 28.312,21 | 163,34 |
| | | | | | | | | 22 | 22 | | | | | | 22 | 28.783,25 | 166,06 |
| | | | | | | | 23 | | | | | | | | 23 | 29.254,28 | 168,77 |
| | | | | | | | | 24 | 24 | 24 | | 24 | | | 24 | 29.724,12 | 171,49 |
| | | | | | | | | | | | | | 25 | | 25 | 30.195,15 | 174,20 |
| | | | | | | | | 26 | 26 | 26 | 26 | 26 | | | 26 | 30.666,18 | 176,92 |
| | | | | | | | | | | | | | 27 | 27 | 27 | 31.125,26 | 179,57 |
| | | | | | | | | | 28 | 28 | 28 | 28 | | | 28 | 31.608,25 | 182,36 |
| | | | | | | | | | | | | 29 | 29 | 29 | 29 | 32.078,08 | 185,07 |
| | | | | | | | | | | 30 | 30 | | 30 | | 30 | 32.543,77 | 187,75 |
| | | | | | | | | | | | | | | 31 | 31 | 33.003,37 | 190,40 |
| | | | | | | | | | | | 32 | | | | 32 | 33.462,95 | 193,06 |
| | | | | | | | | | | | | | | 33 | 33 | 33.922,54 | 195,71 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 34 | 34.382,13 | 198,36 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 35 | 34.840,55 | 201,00 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 36 | 35.299,58 | 203,65 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 37 | 35.758,62 | 206,30 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 38 | 36.217,67 | 208,95 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 39 | 36.676,70 | 211,60 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 40 | 37.135,74 | 214,24 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 41 | 37.594,77 | 216,89 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 42 | 38.056,61 | 219,56 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 43 | 38.516,10 | 222,21 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 44 | 38.975,69 | 224,86 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 45 | 39.435,27 | 227,51 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 46 | 39.894,87 | 230,16 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 47 | 40.354,45 | 232,81 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 48 | 40.814,04 | 235,47 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 49 | 41.273,63 | 238,12 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 50 | 41.733,22 | 240,77 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 51 | 42.192,80 | 243,42 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 52 | 42.652,39 | 246,07 |
| | | | | | | | | | | | | | | | 53 | 43.111,98 | 248,72 |

**Tímalønir = mánaðarløn x 12 : 2080**

Varaleiðarar á dagstovnum 0 - 79, + 1 lønarstig

Varaleiðarar á dagstovnum 80 - 119, + 2 lønarstig

Varaleiðarar á dagstovnum 120 -, + 3 lønarstig

## Føroya Pedagogfelag

**Lønartalva pr. 1. okt. 2012**

**Tænastumannasett**

| Leiðari lítil stovnur | Pedagogar á serstovnum | Leið. stór. Stovnur | Leiðari størstu stovnum | Varaleiðari á serstovnum | | Tænastu-manna-skala | Tímaløn |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | 15 | 20.987,37 | 121,08 |
| | | | | | 16 | 21.245,32 | 122,57 |
| | | | | | 17 | 21.518,13 | 124,14 |
| | | | | | 18 | 21.798,07 | 125,76 |
| | | | | | 19 | 22.085,63 | 127,42 |
| | | | | | 20 | 22.381,00 | 129,12 |
| | | | | | 21 | 22.684,25 | 130,87 |
| | | | | | 22 | 22.995,72 | 132,67 |
| | | | | | 23 | 23.315,21 | 134,51 |
| | 24 | | | | 24 | 23.643,49 | 136,40 |
| | 25 | | | | 25 | 23.980,57 | 138,35 |
| | | | | | 26 | 24.326,45 | 140,34 |
| | 27 | | | | 27 | 24.681,87 | 142,40 |
| | 28 | | | | 28 | 25.091,73 | 144,76 |
| | | | | | 29 | 25.421,50 | 146,66 |
| | 30 | | | | 30 | 25.806,12 | 148,88 |
| | 31 | | | | 31 | 26.201,53 | 151,16 |
| | 32 | | | 32 | 32 | 26.607,72 | 153,51 |
| | 33 | | | | 33 | 27.024,30 | 155,91 |
| | | | | 34 | 34 | 27.452,32 | 158,38 |
| | | | | | 35 | 27.891,81 | 160,91 |
| | | | | 36 | 36 | 28.343,48 | 163,52 |
| | | | | | 37 | 28.807,30 | 166,20 |
| | | | | 38 | 38 | 29.283,21 | 168,94 |
| 39 | | | | | 39 | 29.772,68 | 171,77 |
| | | 40 | | | 40 | 30.289,83 | 174,75 |
| 41 | | | | | 41 | 30.790,91 | 177,64 |
| | | 42 | 42 | | 42 | 31.320,80 | 180,70 |
| 43 | | | | | 43 | 31.823,14 | 183,60 |
| | | 44 | 44 | | 44 | 32.421,85 | 187,05 |
| | | | | | 45 | 32.981,90 | 190,28 |
| | | | 46 | | 46 | 33.557,91 | 193,60 |
| | | | | | 47 | 34.748,72 | 200,47 |
| | | | | | 48 | 36.005,60 | 207,72 |
| | | | | | 49 | 38.018,99 | 219,34 |
| | | | | | 50 | 40.968,13 | 236,35 |
| | | | | | 51 | 44.253,87 | 255,31 |
| | | | | | 52 | 46.964,31 | 270,95 |
| | | | | | 53 | 50.959,67 | 294,00 |

**Tímalønir = mánaðarløn x 12 : 2080**




# Frágreiðing frá nevndini 2012

## Skeið og temadagar

Pedagogfelagið hevur eins og undanfarin ár skipað fyri skeiðum og fundum av ymsum slag. Skeið um truplu samrøðuna við uppfylging var eitt sera væl umtókt tiltak. Fyrst var skeiðið hildið fyri álitisfólkum og seinni fyri allar áhugaðar limir. Fleiri arbeiðspláss hava valt sjálv at skipa fyri hesum skeiði, soleiðis at øll starvsfólk fingu møguleika at luttaka.

Temadagur um tænastumenn var á Hafnia, og varð hesin dagur væl vitjaður. Tað eru nógvir spurningar, bæði um, hvat tað vil siga at vera tænastumaður, og ikki minst um eftirlønarviðurskiftini hjá tænastumonnum.

Trivnaðarkanningin er løgd fram á fleiri fundum, og hevur hetta verið við til at varpa ljós á arbeiðsumstøður hjá limunum í Pedagogfelagnum. Tiltakið hevur verið hildið fyri limir og fyri politikarar.

Á vári 2011 gjørdi Fakfelagssamstarvið av at boykotta fakfelagsskeið umborð á Norrønu. Hetta tí feløgini ikki kundu taka undir við, at nøkur av starvsfólkunum umborð – serliga ungdómar úr Íslandi – vóru sett undir verri treytum enn føroysk starvsfólk. Hetta skuldi vera eitt tiltak um summarið, har sokallaðir "Firvaldar" úr Íslandi mannaðu skipið. At fakfeløg luttaka á fakfelagsskeiðum umborð á Norrønu, vitandi at starvsfólkaviðurskiftini hjá teimum, sum skuldu veita tænastu umborð, ikki vóru líka góð fyri øll, bar snøgt sagt ikki til. Feløgini avlýstu tí øll skeið umborð og sendu út yvirlýsing í miðlarnar.

Temadagur fyri nýútbúnar námsfrøðingar var á Hafnia. Har vóru bæði námsfrøðingar, sum høvdu lisið á netinum, og sum høvdu lisið á føroysku útbúgvingini. Temadagurin gav eina vegleiðing um arbeiðið í felagnum og skipanirnar rundan um tað at vera limur í Pedagogfelagnum.

Árligi barnadagurin var settur av forkvinnuni á Svangaskarði. Tað var hugaligt at síggja so nógv børn og starvsfólk til hendan dagin, har ljós verður varpað á týdningin av rørslu og spæli í námsfrøðiliga arbeiðinum.

Temdagur um harðskap í nærsambondum í NLH. Forkvinnan hevði eitt upplegg um at vaksa upp í einum heimi við harðskapi. Temadagurin var ein byrjan upp á eina verkætlan um fyribyrging av harðskapi m.a. í heimum, har børn vaksa upp.

Javni skipaði fyri stórari ráðstevnu um bústaðarviðurskifti hjá fólki við menningartarni. Forkvinnan hevði eina framløgu um týdningin av sosialpedagogiska arbeiðinum, og hvussu hetta arbeiðið verður tillagað nýggju búformunum. Spennandi verður, hvussu gongdin við at byggja lutaíbúðir fer at eydnast.

Saman við Felagnum fyri Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar luttóku limir í Føroya Pedagogfelag í temadegi um vandan við at arbeiða í vaktararbeiði. Magnar Kleiven, norskur professari, greiddi frá.

Hvørt ár skipar Fasti Gerðarrætturin fyri skeiði fyri nevnd og umsiting í teimum fakfeløgum, sum hava skrivað undir sáttmála við Fasta Gerðarrættin. Aftur í ár luttók Pedagogfelagið. Evnið á einum tílíkum degi er arbeiðsmarknaðarrættur og viðurskifti millum arbeiðsgevarar og fakfeløg. Netverkan er eisini eitt av endamálunum.

## Umsitingin í Pedagogfelagnum

Broytingar eru í umsitingini í Pedagogfelagnum. Katrin Thomsen, sum í mong ár hevur arbeitt í Pedagogfelagnum, er ikki longur í starvi í felagnum. Tvey nýggj starvsfólk eru sett sum málsviðgerar. Tær eru Katrin Poulsen og Eyðvør á Váli. Eyðvør, sum byrjaði í januar 2012, er sett í fyribils starv fram til summarfrítíðina. Katrin Poulsen varð sett í starv í juni 2011. Bára Guttesen kemur aftur til arbeiðis eftir summarfrítíðina, tá hon hevur verið í barnsburðarfarloyvi í eitt ár. Hetta hevur ført við sær umfatandi broytingar, sum seta stór krøv til arbeiðsplássið, og vóna vit, at limirnir taka væl ímóti hesum broytingum.

Nógv mál koyra í felagnum, og fleiri gerðarrættarmál og sakarmál eru í umbúna at leggja fyri. Nøkur mál eru løgd fyri Løgtingsins umboðsmann, eins og fleiri kærur móti kommunum eru reistar.

Nøkur flokkingarmál eru komin undir land, summi eftir sera drúgva málsviðgerð. Fleiri flokkingarmál liggja enn og bíða eftir viðgerð og semju.

Fleiri mál eru um starvslýsingar og setanir, sum ikki eru í tráð við sáttmálan. Hetta er sera álvarsamt, og felagið hevur á fundi við

Mynd: Álvur Haraldsen



# Forkvinnan afturvald komandi trý árini

Nærverkið gjørt vart við hesi viðurskifti, eins og felagið í fleiri førum hevur kært skeivu málsviðgerðina.

## Ráðstevna um sosialt arbeiði í Norðurlondum

Ráðstevna um sosialt arbeiði í truplum tíðum varð hildin í Íslandi seinasta summar. Nevndin luttók saman við øðrum umboðum úr Føroyum. Tilsamans vóru uml. 400 luttakarar úr øllum Norðurlondum við á ráðstevnuni. Áhugaverdir fyrilestrar um sosialpedagogiska arbeiðið og politisku viðurskiftini í okkara grannalondum vóru tema á ráðstevnuni. Fleiri verkstovur vóru, og ein teirra við eini framløgu úr Føroyum. Samanumtikið ein sera góð og áhugaverd ráðstevna.

## Álitisfólkamappan

Álitisfólkamappan er liðug, og er hetta eitt arbeiði, sum nevndin er sera stolt av at hava fingið frá hondini. Vónandi verður hon eitt hent amboð hjá øllum álitisfólkum í framtíðini. Tey, ið verða vald álitisfólk í mars mánaði, fáa øll hesa hentu mappu við tilfari, sum er neyðugt í tí týdningarmikla arbeiðinum sum álitisfólk, og verður hetta vónandi við til at lætta um hjá øllum álitisfólkum.

## Temablað um forskúlar

Nevndin hevur leingi arbeitt við at varpa ljós á børn og skúlabyrjan. Eisini er áhugavert at finna út av, hvussu arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkum, sum arbeiða innan skúlan, eru skipað. Sum vit hava sæð, er tað ikki nóg væl skipað kring landið, og tað skapar stórar frustratiónir hjá okkara limum, sum dagliga starvast innan skúlagátt. Fyri at lýsa ein part av hesum arbeiði og starvsøkið forskúli, hevur Justinus Ejdesgaard gjørt eitt temablað sum kom út beint fyri jól. Saman við hesum temablað er ætlanin at skipa fyri felagstiltaki fyri øllum limum sum starvast á skúlaøkinum. Ein kanning verður gjørd, so nevndin fær greiðu á nøkrum spurningum og viðurskiftum, áðrenn hetta tiltak verður. Ætlanin var at hava ein felags fund í februar, men vegna verkfall eru hesar ætlanir broyttar fyribils.

## Eftirlønir

Nógv fundarvirksemi hevur verið í sambandi við eftirlønirnar hjá limunum í Pedagogfelagnum. Nevndin setti sær fyri at kanna møguleikarnar fyri at savna allar eftirlønir á einum stað. Hetta fyri at veita øllum limum líka góða tænastu. Í løtuni eru tvær ymiskar skipanir, ein fyri námsfrøðingar og ein fyri hjálparfólk. Allir limir gjalda í løtuni 125,- kr. fyri samlagstrygging hjá LÍV. Hesa trygging eru limir glaðir fyri, og tað nýggjasta er, at nú eru vit í einum sjálvstøðugum váðabólki, sum er við til at geva eitt størri bonus í lívstryggingargrunnin. Nevndin ásannar, at summi hava tørv á meira enn hesi eini tryggingini, men tað er ein kostnaðarspurningur fyri tann einstaka, um limir velja aðrar tryggingar enn tær, sum eru frammanundan. Sáttmálasettir pedagogar hava sína eftirlønaruppsparing hjá LÍV, og har keypa summi tryggingar umframt samlagstryggingina. Øll hjálparfólk hava sína eftirlønaruppsparing á 60'ara kontu í Bank Nordik. Nevndin hevur sett sær fyri í framtíðini at bjóða øllum limunum eina og somu skipan. Nógv broytist í eftirlønarviðurskiftunum, og tað nýggjasta er, at LÍV eisini fer yvir til marknaðarrentu eins og Betri Pensjón alla tíðina hevur bjóðað limum sínum. Hvat víðari verður av broytingum, er torført at seta orð á beint nú, tí her rørist nógv á økinum.

## Dagstovnaráðið

Mentamálaráðið setti á stovn eitt dagstovnaráð og valdi nakrar limir við góðum og fjølbroyttum royndum innan námsfrøðiliga fakið at manna hetta ráð. Spent fóru tey til verka við arbeiðssetninginum: *"At ráðgeva mentamálaráðharranum í viðurskiftum á dagstovnaøkinum".* Nevndin í Pedagogfelagnum eins og limirnir í felagnum vóru sera fegin, um at hetta ráð varð sett á stovn. Vit síggja hetta sum ein neyðugan part av arbeiðinum hjá eftirlitsmyndugleikanum, sum er Mentamálaráðið, fyri at tryggja eina fakliga góða og nútímans tænastu á dagstovnaøkinum. Ráðið kom tó ongantíð at virka, tí kommunurnar, sum vóru firtnar um, at tær ikki vóru hoyrdar um hetta arbeiðið, settu forðingar fyri, at fundir kundu haldast

Inntrivini í pensiónsviðurskiftini høvdu við sær munandi bágar fyri limirnar í øllum fakfeløgum, sum hava spart sær eftirløn upp av lønini, eins og avleiðingarnar av hesum inntrivum í framtíðini eru beinleiðis ræðandi.

í arbeiðstíð. Nú hevur landsstýrismaðurin aftur kallað inn til fundar, og vónandi fer ráðið at virka eftir ætlan, tí stórur tørvur er á at hava eitt forum, har námsfrøði verður umrødd soleiðis, at landsstýrismaðurin hevur bestu grund at byggja sínar avgerðir á. Námsfrøðiliga kjakið í sjálvum sær hevur alstóran týdning.

## Arbeiðsbólkar

Leiðararáðið skipaði fyri árligum leiðaradegi. Hetta er eitt vælumtókt tiltak, og undirtøkan fyri tiltakinum var góð. Ætlanin var at skipa fyri fakligum leiðaradøgum umborð á Norrønu, men hetta var av ongum. Dagurin varð í staðin hildin á Hotel Føroyum, og evnið í ár var Mindfullness. Leiðararáðið hevur sambært reglugerð fyri ráðið luttikið á felagsfundum við nevndini, og hava vit saman umrøtt fleiri viðkomandi viðurskifti.

Ein arbeiðsbólkur, sum skal gera samrøður við børn í fíggjarliga trongum korum, er farin til verka. Pedagogfelagið hevur heitt á Beintu Klakkstein um at luttaka í hesum arbeiði fyri felagið. Arbeiðsbólkurin er ein sproti úr tiltakinum "Í menniskjum góður tokki", og verður arbeiðið gjørt í samstarvi við Barnabata. Annlis Bjarkhamar er stigtakari.

Arbeiðið við at skriva námsfrøðiligu vangamyndina er í gongd.

## Norðurlendskt samstarv – „Barnets bedste"

Eins og undanfarin ár eru fundir í norðurlendsku samstørvunum NFFS og NLS afturvendandi tiltøk. Í ár legði ein arbeiðsbólkur í NFFS, har forkvinnan luttók í arbeiðinum vegna Føroyar, seinastu hond á eitt arbeiðsrit um sosialpedagogiskt arbeiði við børnum, sum búgva á stovni. Hetta hevur verið eitt sera áhugavert arbeiði, og tað hevur verið gevandi at eiga pláss í arbeiðsbólkinum. Ein arbeiðsfundur var hildin í Føroyum, og var tað ein sera góð kensla at vera vertur í einum so týðandi arbeiði. Arbeiðsritið er nú endaliga liðugt og verður ein av komandi døgunum sent avvarðandi myndugleikum og starvsfólkum, sum starvast innan Børn og ung í Nærverkinum.

## Stjórnarskiftið

Nýval var útskrivað, og setti tað samráðingarnar á stand-by í longri tíð. Tá valið var av, bjóðaðu nýggju flokkarnir til samgongusamstarv, og vit fingu eina borgarliga stjórn. Tað vóru ikki eiti á broytingar, sum tá stóðu fyri framman í føroyska samfelagnum. Størstu málini vóru broytingar í skatting av pensjónum og flatskattur. Mikið rumbul stóðst av hesum, og fakfeløg stríddust at forða fyri, at hesar so grundleggjandi broytingar vóru framdar, tí tær komu at kosta limum í Pedagogfelagnum pengar. Hóast stór mótmælistiltøk, nógvar fundir og larman við karamellublikkum o.ø. vórðu atkvøðugreiðslurnar avgreiddar tollaksmessudag við einum meiriluta fyri í samgonguni. Hesin dagurin var eitt dygt slag fyri fakfelagsrørsluna og samhaldsfasta samfelagið. Inntrivini í pensiónsviðurskiftini høvdu við sær munandi bágar fyri limirnar í øllum fakfeløgum, sum hava spart sær eftirløn upp av lønini, eins og avleiðingarnar av hesum inntrivum í framtíðini eru beinleiðis ræðandi.

## Samráðingar

Í ljósinum av broyttu politisku støðuni fóru sáttmálasamráðingarnar í gongd aftur av nýggjum við einum nýggjum fíggjarmálaráðharra við borðið. Tað var ikki tespiligt at síggja stóra vanbýtið, sum lágløntir løntakarar og flestu limirnir í Pedagogfelagnum nú komu út fyri. Flatskattaskipanin røkkur ikki til bata fyri flestu limirnar í Pedagogfelagnum, og parolan um, at tað skal loysa seg at arbeiða, gevur onga meining her. Samstundis missa limir beinleiðis pening av pensiónsskattingini, sum nú er ásett at vera 40% ímóti minni frammanundan. Sum lágløntur kvinnubólkur, ið arbeiðir niðursetta tíð, eru limirnir í Føroya Pedagogfelag settir í eina ringa støðu av nýggju politisku skipanini. Tað er torført at síggja, hvussu hesi inntriv skulu bøta um samhaldsfestið og fólkatrivnaðin í landinum.

## Samráðingarslit

Samráðingarnar aftan á samgonguskiftið vóru torførar, og útlitini fyri at finna eina semju vóru vánalig. Samráðingarnar slitnaðu stutt eftir, at Maskinmeistarafelagið eisini hevði slitið samráðingarnar. Farið var at leita eftir semingsfólki, og tað tók drúgva tíð, áðrenn báðir partar kundu semjast um, hvør skuldi taka á seg uppgávuna at finna eina semju millum partarnar. Petur Joensen bleiv valdur, og skuldi hann finna ein aftrat sær sum semingsmann; tað bleiv Petur Zachariassen, sum bleiv orðførandi av teimum báðum.

## Semingin

Semingin byrjaði 21.januar á Hotel Føroyum og vardi í góð 5 samdøgur. Tað vóru fimm hørð samdøgur, har tvey tey seinastu vóru uttan nakra song at liggja í. Vit skiftu høli trígjar ferðir, og umstøðurnar vóru á markinum til at vera ótolandi. Endin var, at eitt semingsuppskot bleiv lagt fram, uttan at nakað av serkrøvunum hjá Pedagogfelagnum var við á skjalinum. Tað kundi nevndin ikki liva við, og vit mótmæltu og fingu at vita, at hetta var ein feilur, sum vit síðani royndu at rætta. Tað eydnaðist ikki, og øll feløgini í Fakfelagssamstarvinum vrakaðu semingsuppskotið. Næsta stig var, at arbeiðsgevarin bjóðaði hvørjum felag sær at koma á fund at skriva undir. Nú var støðan tann, at feløgini vóru ymisk á máli um, hvørt tað var skilagott at skriva undir ella ikki. Nevndin í Pedagogfelagnum var ikki í iva um, at so leingi einki serkrav var við í semjuni, sum nevndin hevði raðfest

> At fakfeløg standa saman um at samstarva, hevur kanska ongantíð verið so neyðugt sum beint nú.

undir semingini, so kundu vit ikki skriva undir. Vit fóru tískil heldur ikki á fund, men kallaðu álitisfólkini inn til fundar um støðuna. Álitisfólkini tóku undir við nevndini í, at hetta kundi ikki ganga. Avgerð var tí tikin um at boða frá verkfalli fyri allar sáttmálasettar limir felagsins frá týsmorgni tann 31. januar 2012 kl. 7.00.

## Fakfelagssamstavið

Fakfelagssamstarvið stóð sína roynd í samráðingunum við lønardeildina í fíggjarmálaráðnum og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Leisturin, samráðingarnar vóru lagdar eftir, vóru beinleiðis atvoldin til, at hesar felagssamráðingar fingu vánalig kor. At feløgini í útgangsstøði eru sera ymisk, er ikki endiliga ein trupulleiki, men vantandi hugurin frá mótpartinum til at samráðast gav okkum ein trupulleika. Føroya Lærarafelag hevur tikið seg úr samstarvinum, og eftir eru nú bert trý feløg, Starvsmannafelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Pedagogfelag. Nevndirnar koma á eftirmetingarfundi at taka støðu til framtíðina hjá Fakfelagssamstarvinum. Við hesum broytta grundarlag er neyðugt at umhugsa støðuna og framtíðina hjá Fakfelagssamstarvinum, ið hvussu er viðvíkjandi samráðingum. At fakfeløg standa saman um at samstarva, hevur kanska ongantíð verið so neyðugt sum beint nú. Høgrasnaringin er við til at geva fakfelagsrørsluni ring kor at virka undir, og tí er tað sera umráðandi at standa saman. Verður spurt, um tað í løtuni er rætt at samráðast saman, mugu vit nokk ásanna, at tað er tað ikki. Tó eru nógv mál, sum vit eiga at loysa í felag, og enntá við fleiri fakfeløg enn teimum, sum vóru í Fakfelagssamstarvinum. Framtíðin setir stór krøv til eina sterka fakfelagsrørslu, og saman standa vit sterk.

*Góðan aðalfund.*



# Ein spurningur um DYGD



*Á loftinum í KÍ høllini eru pedagogar og hjálparfólk í ferð við at skráseta seg fyri dagin.*

*Meðan verkfallið var, prátaði Edvard í Skorðini Joensen við nøkur av verkfallsfólkinum.*

*Fyri at fáa so gott úrslit sum gjørligt er neyðugt við góðari fyrireiking, áðrenn arbeiðið verður gjørt. Tað er tíð til hesa fyrireiking, pedagogar og hjálparfólk í verkfalli biðja um*




*Dansur*

Orð og myndir: Edvard í Skorðini Joensen

-Vit biðja bara um rætt til at gera tað arbeiðið, vit eru sett til – ordiliga. Fyri at fáa besta úrslitið, vilja vit sleppa at leggja tað ordiliga til rættis. Skulu vit í dag fara burtur frá til at rætta ella bøta um eitthvørt, er eingin at seta ístaðin, tí vit fáa ikki vikarar. Tað vil siga, at tað manglar fólk á stovunum, og meira arbeiði verður til tey, sum eftir eru.

Tað er eingin ivi millum pedagogarnar, vit hittu hendan dagin, vit vóru og vitjaðu verkfalsfólk norðanfyri. Tað, sum liggur fremst, er kravið um tíð at fyrireika dagliga arbeiðið.

Tað er mánamorgun, og klokkan er júst farin av níggju. Á loftinum í KÍ høllini í Klaksvík møtast pedagogar og hjálparfólk at skriva seg inn.

Asta Svøðstein, sum er álitisfólk, sigur, at í Klaksvík hava tey ikki merkt nakað til, at fólk halda tað vera órímiligt, at tey seta tey krøv, tey seta.

– Fólk tykjast at skilja væl, at vit vilja hava meira tíð at fyrireika okkum til okkara arbeiði. Tað er sjálvsagt, halda fólk, eg havi tosað við, at ein er fyrireikaður til tað, ein fer undir, sigur hon, og staðfestir, at verkfall er ikki gott fyri nakran.

## Vitja kommunuskrivstovuna

Eisini hinumegin Norðoyartunnilin eru fólk í ferð við at fyrireika eitt tiltak fyri at vísa á síni ynski.

Í hølunum hjá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag hittast fólk úr Eysturkommunu og Fuglafirði at fyrireika eitt felags tiltak, har gangast skal í skrúðgongu til kommunuskrivstovuna úr Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Fríðgerð Baldvinsson, álitiskvinna, er púra samd við starvsfelaganum í Klaksvík. Fólk skilja væl krøvini, og eingin tykist vera í iva um, at tað er ein sjálvsagdur rættur, ið biðið verður um.

Hon greiðir frá, at tey hava skipað fyri onkrum tiltøkum hesar dagarnar, verkfallið hevur verið, og at tey eru væl móttikin allastaðni.

Tað var heldur einki undantak, tá allur riðilin møtti upp uttan fyri kommunuskrivstovuna hjá Fuglafjarðar kommunu. Borgarstjórin, Sigurð Simonsen, stóð uttanfyri og tók ímóti og prátaði við fólk. Hann fekk eina gjøgnumgongd av málinum, sæddum úr sjónarhorninum hjá starvsfólkunum.

## Vænta viðhald

– Tað tykist, sum fólk yvirhøvur skilja okkara støðu, og tað skuldi givið vónir um, at vit fara at fáa viðhald, heldur Nomi Høghamar, sum er álitisfólk hjá starvsfólkunum á Eiði, sum eisini skipaðu fyri tiltøkum undir verkfallinum.

Hon vísir á, at tað átti ikki at verið so ringt at skilt, at tað er neyðugt við fyrireikingartíð, tá ein skal arbeiða við børnum, soleiðis sum tey dagliga gera í ansingarstovnunum.

-Vit koma til arbeiðis um morgunin, og har er bara akkurát fyri av fólki. Er so okkurt, sum ikki gongur júst, sum tabellin sigur, noyðast vit at fara frá fyri at finna útav, hvussu vit greiða hetta. Men tað kemur eingin aftur í staðin fyri tann, sum fer frá, tí avloysarar fáast ikki. Og so manglar fólk, vísir hon á.

Allar eru tær á einum máli um, at tað má vera ein rættur, at starvsfólkini fáa tíð at fyrireika tað, tey skulu gera. Og fáa løn fyri ta tíðina, tey nýta til hetta. Sum er, noyðast tey at gera slíkt eykaarbeiði í síni frítíð, og um tað skuldi hent, at tey fáa møguleika at gera tað í arbeiðstíðini, merkir tað, at tað skal avspákast.

– Og so eru vit aftur í sama trupulleikanum, at tann, sum avspákar, manglar á stovuni. Tí framvegis ber ikki til at fáa vikarar fyri tey, sum av einihvørji orsøk eru burturfrá, sigur Nomi Høghamar.

# Virknir pedagogar í verkfalli

*Umframt teir batar, pedagogarnir fingu við nýggja sáttmálanum, kann ikki sigast annað, enn at teir veruliga fingu varpað ljós á fakið.*




Orð og myndir: Tórfinn Smith

Við fundum, sangi, tónleiki, kakao og bollum og alskyns øðrum tiltøkum fingu pedagogar í verkfalli veruliga gjørt vart við seg og síni sjónarmið. Eingin í Føroya landi kann í dag av røttum siga, at hann ikki kennir eitt sindur til, hvat pedagogar takast við í dagliga arbeiða sínum, takkað verið teimum mongu tiltøkunum kring alt landið. Pedagogfelagið skipaði so fyri, at álitisfólk kring landið samskipaði tiltøkini, hvørt í sínum øki, umframt at luttaka í størri tiltøkum í høvuðsstaðnum. Vit hava tosað við nøkur av álitisfólkunum, sum samskipaðu tiltøkini.

## Kaffi úr barnavogninum

Fríða Egholm var samskipari í Norðurstreymoy. Hon letur sera væl, at hvussu virknir limirnir vóru undir verkfallinum, og hugskotini trutu ikki, hvat tey skuldu finna uppá fyri at gera vart við síni sjónarmið. Tey hildu m.a. til í missiónshúsinum, har tey skipaðu seg í bólkar, sum hvør skuldi taka sær av teimum ymisku uppgávunum. Har vóru faldarar gjørdir og greinar skrivaðar, og dúgliga gingu tey runt í bygdunum, dansaðu føroyskan dans og heilsaðu upp á fólk og vitjaðu ymisk virkir. Borgarstjórin í Vestmanna fekk eisini vitjan av teimum, og á Torginum varð ein barnavognur umgjørdur til kaffivogn, sum var dúgliga vitjaður. Føstlávintsmánadag slógu tey tunnu við tunnilsmunnan Leynarmegin. Fríða hevði roknað við, at foreldur, sum orsakað av verkfallinum ikki fingu børnini á stovn, fóra at gera meira vart við seg, men so var ikki.

– Tey royndu at finna ymiskar loysnir og tóktust at skilja sjónarmiðini hjá pedagogum í verkfalli væl. Mong foreldur søgdu seg undrast á, at lønin hjá pedagogum er so lítil, sum hon er, og somuleiðis vóru eisini mong, sum ikki vistu rættiliga, hvat okkara krav um fyrireikingartíð snúði seg um, og tí var neyðugt at greiða frá tí, sigur Fríða, sum er væl nøgd við úrslitið av átøkunum og nýggja sáttmálanum. Lønin kundi sjálvandi verið frægari, men tað, sum fekst í sáttmálan um fyrireikingartíðina, heldur Fríða hava stóran týdning.

## Ídnir limir

Miriann Hentze var samskipari á Sandoynni. Við gongutúrum í bygdunum, røðum og sangi royndu pedagogarnir á Sandoynni at gera vart við seg. Miriann Hentze letur væl at áhuganum millum limirnar, og hvussu væl teir møttu til tey ymisku tiltøkini, sum tey skipaðu fyri. Hon er heilt ovfarin av, hvussu mong av bygdafólkinum komu framvið at fáa sær kaffi og køkur, sum tey onkran dagin borðreiddu við uttandura. Einki merkti hon til nakra illstøðu frá foreldrum, sum tóktust at skilja sjónarmiðini hjá pedagogunum sera væl. Ikki minst skiltu foreldur tað, at felagið ynskti meira tíð til fyrireiking, sum eisini var eitt av høvuðsmálunum.

Miriann heldur, at limirnir har um leiðir eru væl nøgdir við sáttmálan, og ikki minst tað sum fekst í sambandi við fyrireikingartíðina.

– Best var, um eitt ávíst tímatal til fyrireiking varð ásett, men hóast alt er tað nú niðurfest á blað, sum áður var meira ella minni goodwill. Tað týdningarmesta er, at vit nú fáa betri tíð og harvið møguleikar at eygleiða børnini, soleiðis at vit kunnu útinna okkara uppgávur best nøktandi, sigur Miriann, ið arbeiðir sum hjálparfólk á vøggustovuni í Barnagarðinum hjá Sands kommunu.



# VERKFALLSTILTØK



Mynd: Tórfinn Smith

Í Vági



Mynd: Edvard í Skorðini Joensen

Fuglafirði

## Tóku ímóti Heðini

Eitt av verkfalstiltøkunum hjá pedagogunum í Vágum var at taka ímóti, tá Heðin Mortensen, formaður í Kommunusamskipanini, kom við flogfari úr Danmark. Sum formaðurin fyri øðrum sáttmálapartinum var Heðin ein rættiliga týðandi partur í málinum, og tí ráddi sjálvandi eisini um at geva honum eina hóskandi móttøku. Og tað fekk hann frá teimum umleið 100 pedagogunum, sum møttir vóru á flogvøllinum hendan dagin. Heðin kvittaði við at játta at gera sítt besta fyri at fáa gongd aftur á samráðinganar. Nancy Magnussardóttir, samskipari hjá pedagogunum í Vágum, letur sera væl at bæði uppmøting og hvussu ídnir hennara starvsfelagar vóru, meðan verkfallið vardi. Teir vóru sjónligir á mangan hátt, m.a. tá gingið varð millum bygdir.

– Vit hildu tað hava stóran týdning at fáa foreldur at skilja okkara sjónarmið, og tí kallaðu vit foreldraráðini í oynni til fundar og greiddu frá, hvat verkfallið og tiltøkini snúðu seg um. Serliga spurningin um fyrireikingartíð. Frammanundan vóru nógv foreldur, sum ikki vistu rættiliga, hvat lá í spurninginum um fyrireikingartíðina, men eftir at vit høvdu greitt frá, skiltu tey øll okkum.

– Sáttmálaúrslitið kundi sjálvandi hugsast betri, serliga at vit ikki vóru fyri reallønarmissi, men meira fekst so ikki hesaferð, heldur Nancy, sum tó fegnast um tað, sum fekst í sáttmálan í sambandi við fyrireikingartíðina, sum nú kann leggjast í eina meira fasta legu. Nú stendur SKAL heldur enn KANN, og tað er sjálvandi eitt stórt framstig, sigur Nancy, sum arbeiðir sum námsfrøðingur í Alvalon í Sørvági.

## Øll vóru til reiðar

– Tað var eitt sindur tungt í byrjanini at fáa øll við, men tá nakrir dagar vóru farnir av verkfallinum, gekk munandi betur, soleiðis at allir limir í okkara øki stóðu saman og vóru til reiðar at fara undir tey tiltøk, sum ikki vóru so fá í tali, sigur Kristvør Eliasen, samskipari í Norðoyggjum. Hon greiðir frá, at fyrstu dagarnir fóru við at leggja ymisk tiltøk til rættis. Tey skipaðu seg í bólkar, sum hvør fekk sína uppgávu. Tað ráddi um at gera seg sjónligan á ymiskan hátt, og til tess vórðu greinar skrivaðar, fundir hildnir við røðum, tónleiki, kaffi og køkum. Dúgliga gingu tey gjøgnum býin, vitjaðu handlar og hongdu uppsløg ymsastaðni, har nógv fólk vanliga koma. Tey skipaðu eisini fyri einum serliga stórum tiltaki í Klaksvík við røðum og tónleiki, sum var sera væl vitjað.

Kristvør sigur, at hóast mong foreldur høvdu stórar trupulleikar at fáa gerandisdagin at ganga upp, nú pedagogarnir ikki vóru til arbeiðis, gav eingin ilt av sær.

– Foreldrini skiltu væl, hvørjum pedagogarnir stríddust fyri. Serliga eftir at vit høvdu greitt væl og virðiliga frá, hvat lá í kravinum um fyrireikingartíð, og tað er júst tað, vit fingu í sáttmálan um fyrireikingartíðina, sum eg haldi vera tað besta. Nú er hetta ein skrásettur rættur, og ikki longur bert ein góður vilji, sigur Kristvør, sum arbeiðir í Frítíðarskúlanum í Klaksvík.

## Faklig tiltøk

Skálafjarðarøkið er víðfevnt við fleiri stovnum og harvið mongum starvsfólkum, og tí avráddu tey har at skipa seg soleiðis, at tey náddu út í flestu krókar. Joan Sandursdóttir, sum samskipaði tiltøkini har um leiðir, greiðir frá, at fyrstu dagarnar fyrireikaðu tey seg til tiltøkini, skrivaðu greinir, gjørdu skelti og royndu at vera so sjónlig sum gjørligt, eitt nú við føroyskum dansi ymsastaðni. Tey gingu dúgliga runt í teimum ymisku bygdunum við skeltum og sangi, og í Runavík skipaðu tey eisini fyri einum størri tiltaki eitt nú við ballónum í hópatali við rundkoyringina í Runavík.

Á Strondum hildu tey fyri ein part til í bygdahúsinum, sum eisini hevur biograf, har tey eisini skipaðu fyri eitt nú fleiri fakligum tiltøkum, m.a. onkrum fakligum filmi, tey viðgjørdu spurningar viðvíkjandi børnum og konfliktum, og onkran fyrilestur høvdu tey um autismu.

Joan sigur seg ikki hava merkt sær nakra illstøðu frá foreldrum, sum sjálvandi vóru rættiliga nógv darvað av verkfallinum, men tey tóktust at fata sjónarmiðini hjá pedagogunum, hóast tey ikki vistu nágreiniliga, hvat málið um fyrireikingartíð snúði seg um.

– Eg veit ikki rættiliga, hvørja hugsan fólk flest hava um, hvat pedagogar gera í sínum arbeiði. Tað vóru í hvussu er nógv, sum spurdu, hvat veruliga lá í spurninginum um fyrireikingartíð, og hesum royndu vit sjálvandi at greiða frá, og tað haldi eg eydnaðist væl, sigur Joan og leggur aftrat, at hennara starvsfelagar prátaðu eisini dúgliga sínámillum um spurningar viðvíkjandi fyrireikingartíð.

– Við nýggja sáttmálanum er fyrireikingartíðin viðurkend í størri mun enn áður, og tað er eitt stórt framstig, sigur Joan, sum heldur, at umboðini fyri kommunurnar tykjast at skilja tað neyðuga við fyrireikingartíð munandi betur enn hvat landspolitikkararnir gera. Joan Sandursdóttir arbeiðir sum pedagogur á Lítla Fløtti á Strondum.

## Ikki bert ansing

Eins og aðrastaðni royndu pedagogar í Eysturkommunu at gera seg so sjónligar sum gjørligt við m.a. fundum við røðum, sangi og føroyskum dansi. Millum annað vitjaðu tey eisini borgarstjóran í Fuglafirði, sum tók væl ímóti teimum. Karla Maria Joensen, samskipari í Eysturkommunu, letur sera væl at, hvussu væl limirnir vóru við til alt, sum ivaleyst eisini hevur gjørt, at foreldur og onnur avvarðandi at børnum, sum ikki sluppu á stovn, vóru so jalig. Karla Maria sigur, at foreldur skiltu sera væl boðskapin um fyrireikingartíð, tí, sum fleiri teirra søgdu, tað snýr seg ikki bert um at fáa børnini ansað, tað skal meira til enn so, tí pedagogar hava nógvar og krevjandi uppgávur.

Karla Maria, ið arbeiðir sum hjálparfólk í Frítíðarskúlanum á Kambsdali, heldur orðingina í sáttmálanum um fyrireikingar-



Mynd:Tórfinn Smith

Í Vági



Mynd:Tórfinn Smith

Í Vági



Anna Maria Anthoniusen heldur røðu á Vaglinum

Mynd: Ole Valle

tíð vera stórt framstig, hóast tey í Frítíðarskúlanum har raðfesta fyrireiking ógvuliga frammarlaga, men nú stendur tað í sáttmálanum og er tí meira formelt, heldur enn sum áður – ein innanhýsis avtala.

## Nógvir spurningar um fyrireiking

Eg hoyrdi ongantíð eitt øvut orð frá mínum starvsfeløgum, tá vit sótu og fyrireikaðu ymisk tiltøk. Øll vóru eldhugað og stóðu saman um alt, sum vit tókust við. Tað sigur Anna Maria Anthoniussen, sum samskipaði verkfalstiltøkini í syðra helmingi av Suðuroynni. Tiltøkini vóru bæði mong og fjølbroytt. Tey kliptu hjørtu, sum prýddu ymsastaðni á bygd og í bý, skrivaðu greinir, skipaðu fyri fundum og sangi, vitjaði á virkjum og í handlum og prátaðu við fólk. Fyri at fáa greiði á, hvat fólk halda um pedagogiska arbeiðið, býttu tey spurnarbløð út. Anna Maria sigur, at í byrjanini av verkfallinum fingu tey nógvar spurningar um, hvat fyrireikingartíðin snýr seg um, og hesum spurningum royndu tey at svara so væl sum gjørligt.

– Eg haldi, at fólk flest skiltu okkara sjónarmið, tá vit greiddu frá, hvat arbeiðið í høvuðsheitum snýr seg um, m.a. hetta at vit gera eina menningarætlan fyri hvørt barnið, og snýr tað seg um børn, sum hava serligan tørv, krevst enn meira tíð til eitt nú fyrireiking, sigur Anna Maria.

Sama sigur hennara starvsfelagi, Heidi Bech á Tvøroyri, sum samskipaði tiltøkini í norðara helmingi av oynni, sum eisini fekk nógvar spurningar um fyrireikingartíð. Hava tey ikki lært nokk, var onkur sum spurdi, men við at greiða nærri frá, tóktust øll at skilja okkara sjónarmið, sigur Heidi. Eins og Anna Maria letur eisini Heidi sera væl at, hvussu væl limirnir vóru við í øllum lutum. Nøkrum av tiltøkunum skipaðu tær fyri hvør í sínum øki, og í øðrum førum saman. Tær eru samdar um, at gott var at fáa eina greiðari orðing í sáttmálan í sambandi við fyrireikingartíðina.

## „Góði Jørgin"

Um tað var sangurin „Góði Jørgin" sum gjørdi munin, so semja loksins kundi fáast, skal vera ósagt, men tað var so í hvussu er ein roynd frá teimum í Norðstreymoy, tá tey umorðaðu gamla slagaran hjá landsstýrismanninum við fíggjarmálum. Men tað var kortini ikki alt, sum tey tókust við. Bjørg Lützen, sum samskipaði tiltøkini hjá pedagogunum í Norðstreymoy, sigur, at tey royndu, eins og starvsfelagarnir kring landið, at vera sjónlig við sangi og øðrum tiltøkum. Limirnir vóru sera virknir alla tíðina, so har var eingin slingur í valsinum, sum hon tekur til.

Bjørg heldur, at hóast fleiri av foreldrunum at børnum á stovni høvdu tað torført, nú pedagogarnir vóru í verkfalli, skiltu tey støðuna. Tað vóru tey, sum høvdu spurningar í sambandi við fyrireikingartíð, og tá tey fingu okkara søgu um tann spurningin, tóktust øll at skilja og góðtaka tað, sigur Bjørg, ið starvast sum pedagogur í barnagarðinum í Hvalvík. Hon fegnast um orðingina í sáttmálanum um fyrireikingartíðina, sum nú er meira konkret, enn hon áður var.

## Full av hugskotum

Tá tað gjørdist greitt, at ikki slapst undan verkfalli, ráddi um at fyrireika seg og skipa seg sum best. Nógv hin størsti hópurin av pedagogum er í miðstaðarøkinum, og fyri at taka sær av hesi stóru avbjóðing, vóru fýra fólk vald í ein sonevndan stýrisbólk. Tær vóru Diana Mouritsen, Sóleyg Samuelsen, Tórun Dánjalsdóttir og Jannie S. Jacobsen. Jannie greiðir frá, at tær gjørdu sær beinanvegin nakrar tankar um ymisk tiltøk, plakatir, skelti og slagorð, men tað var so skjótt, at fólk vóru full av hugskotum, sum tær tóku til sín og lótu víðari til onnur. Hesin parturin gekk meira ella minni av sær sjálvum, heldur Jannie. Men har var annars nógv hjá stýrisbólkinum at halda skil á. Hvønn dag skuldu allir møttir limir skrásetast, og støða skuldi takast til, hvar hvør skuldi møta til tey ymisku tiltøkini. Viðhvørt hildu tey til í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag og í Sjónleikarhúsinum.

Hvønn einasta dag var okkurt á skránni, og harumframt nøkur størri tiltøk, sum limir kring alt landið vóru dúgligir at møta til, og tað heldur Jannie vera eina ómetaliga styrki hjá teimum øllum.

Jannie sigur, at ein av stóru uppgávunum var at greiða fólki frá spurninginum um, hví tey løgdu so stóran dent á fyrireikingartíðina. Tað var ógvuliga ymiskt, hvussu fólk flest fataðu hetta.

– Vit skuldu faktiskt vera rættiliga pedagogisk fyri at greiða fólki frá, hvat lá í hesum. Tað var ikki altíð líka lætt, men eg haldi, at flestu fólk skiltu, hví vit halda, at fyrireikingartíðin hevur so stóran týdning. Tað vóru eisini tey, sum spurdu, hví fyrireikingartíðin júst nú var vorðin so aktuell, og tað var jú eisini ein sera góður spurningur. Veruleikin er jú tann, at vit eru komin í eina fasta rútmu at arbeiða við fyrireiking uttan at fáa nakað fyri tað. Heimaarbeiði uttan løn, men tað halda vit ikki longur vera rætt og rímiligt, sigur Jannie.

Jannie heldur, sum vera man, at best var, um tað ikki var neyðugt við verkfalli, men tá tað nú skuldi vera, so var hetta rætti framferðarhátturin.

– Vit vildu gera vart við okkum á ein friðarligan og sømiligan hátt. Tú kemur ofta longst á tann hátt. Vit órógvaðu ikki onnur enn tey, vit skuldu órógva, sigur Jannie, sum heldur, at tiltøkini vístu millum annað, at tey eru mong, sum ikki vita, hvat arbeiðið hjá pedagogum veruliga snýr seg um, og tí eigur felagið at gera meira við at gera fakið sjónligt.




*Aftur ein setningur, sum hekk uppi á vegginum.*



*Ein tekning um mentalisering, sum er ein av arbeiðsháttunum, tey nýta har.*




*Fleiri tílíkir setningar hingu runt um í skúlastovuni, soleiðis at familjurnar og børnini kundu minna seg á hetta.*



*Vit sita og lurta undirvísarunum, ímeðan teir greiða frá um Familjuskúlan*

Vit eru nøkur námsfrøði- og læraralesandi á Fróðskaparsetri Føroya, ið við ársbyrjan 2011 valdu linjuna Sernámsfrøði. Tá vit byrjaðu á linjuni, kunnaði lærarin, Katrin av Kák, okkum um Marlborough Family Center í London, ein stovnur, ið bjóðar børnum, ið hava tað trupult, antin persónliga ella fakliga, og familjum teirra viðgerð og ráðgeving. Ein av høvuðshugsjónunum handan Marlborough Family Center er hendan:

„Allir einstaklingar, óansæð hvussu illa stillað tey vísa seg at vera, hava resursur. Hendan sannføring – sum møguliga kann kallast ein fordómur – hjálpir okkum til at eggja familjunum til at hjálpa hvørjari aðrari".

Vit hildu, at hesin stovnur og teirra arbeiðsháttur var ógvuliga áhugaverdur, og fóru tí undir at savna inn til eina námsferð, soleiðis at vit kundu vitja stovnin. Tíverri eydnaðist okkum ikki at sleppa at vitja í London, men vit funnu fram til ein familjuskúla í Gladsaxe í Danmark, ið arbeiddi eftir júst sama leisti. Sigast kann, at familjuskúlin í Gladsaxe er ein avleggari av Marlborough Family Center.

## Hvat er familjuskúlin í Gladsaxe, og hvussu virkar hann

Familjuskúlin er eitt tilboð fyri barnafamiljur í Gladsaxe kommunu.

Tilboðið er fyri børn, sum hava tørv á broytingum fyri at kunna trívast betur í skúla og heimi. Hesi børn og familjur teirra hava ymiskar trupulleikar at stríðast við. Trupulleikarnir kunnu eitt nú vera: barnið vil ikki í skúla, barnið hevur tað ikki so lætt við autoritetum, at ein sum foreldur følir, at ein ikki hevur nøktandi samskifti við læraran hjá barninum, at barnið følir seg happað/hildið uttanfyri, at ein sum foreldur kennir seg máttleysan í sambandi við at gera nakað við trupulleikan, at familjan hevur tørv á at útnytta sínar egnu resursur betur o.s.fr.

Viðvíkjandi endamálinum hjá teimum á skúlanum siga tey, at:

## „Målet er at skabe børn der trives"

Hugsanin við familjuskúlanum er, sum áður nevnt, tann sama sum í Marlborough Family Center í London, og starvsfólkini á familjuskúlanum í Gladsaxe hava nomið sær vitan haðani.

Tað er gjøgnum skipanina, at eitt barn saman við foreldrunum verður víst til familjuskúlan. Allir skúlarnir í Gladsaxe kommunu hava ein sosialráðgeva knýttan at skúlanum, og tað er hann, ið vísir familjunum til familjuskúlan, um hann metir, at tað kundi hjálpt. Familjan hjá barninum kann eisini seta seg í samband við sosialráðgevan, um tey meta, at tørvur er á tí. Síðan vísir sosialráðgevin teimum víðari til familjuskúlan.

Á familjuskúlanum arbeiða tey sera terapeutiskt, og tey nýta m.a. systemteori og mentalisering í arbeiðinum við at hjálpa familjunum við teirra trupulleikum. Fyri at skilja børnini nýta tey m.a. ástøði hjá Stern um, hvussu sjálvið mennist, og eisini relatiónsástøði.

Familjurnar koma inn 2-3 ferðir um vikuna í nakrar tímar, sum oftast fyrrapart, og tað kann ganga fyri seg í upp til ½ ár. Eisini hava tey familjuflokkar, sum koyra eftir sama leisti sum familjuskúlin. Munurin er tann, at her er tað 5 tímar um vikuna, tað snýr seg um. Tað einasta, sum krevst, er ein hugnalig floksstova (kaffi,te og stearinljós) og sjálvsagt útbúgvið fólk[1].

Tá ið ein familja byrjar á famljuskúlanum, verður ein fundur hildin saman við hinum familjunum, sum longu eru á skúlanum. Her leggja tey saman við familjunum til rættis, eina samarbeiðsavtalu, har støðið verður tikið í teimum resursum, familjurnar hava. Sostatt verður dentur lagdur á, hvat barnið megnar – á tað góða í barninum. Hendan avtalan byggir á tær broytingar, familjan ynskir, og hvat allar familjurnar í felag ynskja. Hendan avtalan er grundarlagið undir arbeiðinum á familjuskúlanum.

Allar familjurnar sita saman, og hvør familja kemur fram við sínum trupulleika. Á tann hátt kunnu familjurnar hjálpa hvørji aðrari við trupulleikunum.

Starvsfólkini á familjuskúlanum leggja dent á at hugsa seg væl um, tá ið tosað verður við foreldrini fyri ikki at sýnast áleypandi. Tað hevur týdning at vísa foreldrunum, at brúk er fyri teirra hjálp fyri at finna eina loysn á trupulleikanum. Foreldrini eru jú tey, sum vita mest um barnið.

Tey halda, at tað er ein gáva, at familjan er við, tí tað, sum foreldrini ikki megna, megnar lærarin heldur ikki.

Eingin orsøk er til at halda, at vit ikki hava somu trupulleikar her í Føroyum sum uttanlands. Sostatt kundi tað avgjørt verið áhugavert at roynt hendan arbeiðshátt her.

Samanumtikið var hetta ein sera spennandi og lærurík námsferð, ið avgjørt hevur givið okkum nógv, sum vit kunnu hava við okkum í okkara komandi yrki sum námsfrøðingar og lærarar.

*1 Tað er møguleiki at senda fólk á skeið, antin á Familjuskúlanum í Gladsaxe ella á Marlborough Family Centre í London.*

# Pedagogisk vøddamýking

## -at skapa vælveru, góðar relatiónir og at fáa eina góða kroppsfatan

Orð og mynd: Tórfinn Smith

Samanborið við tað, vit vanliga skilja við vøddamýking hjá t.d. einum fysioterapeuti, er pedagogisk vøddamýking rættiliga øðrvísi, bæði tá ræður um framferðarhátt og grundleggjandi endamál. Pedagogisk vøddamýking hevur sera jaliga ávirkan á fólk, sum á ein ella annan hátt eru soleiðis fyri, at tey hava tørv á serligari viðgerð. Eitt nú til fólk við menningartarni og fólk við sálarligum sjúkum. Pedagogisk massasja hóskar eisini væl í barnagørðum, har pedagogurin brúkar massasju í skipaðum spælið. Í stuttligum umhvørvi læra børnini at kenna sín krop og sínar kropsligu avmarkingar, og tey læra at virða kropsliga rúmið hjá øðrum børnum. Hetta minkar í ein stóran mun um happing . Tá tú hevur tað gott kropsliga, eru møguleikarnir at mennast og læra nógv størri.

Sólrun Ziska er pedagogur á Verkhúsinum Virkni á Berjabrekku í Havn og arbeiðir tí við fólki, sum hava serligan tørv. Tað var m.a. tað, sum fekk hana til at nema sær útbúgving sum pedagogiskur vøddamýkjari. Ein útbúgving, sum gongur yvir tvey ár, har ein partur er skipaður sum undirvísing og annars við praktisku royndum. Sólrun greiðir frá, at fólk við menningartarni mangan ikki eru før fyri at siga frá sínum trupulleikum og tørvi, og at tey hava aðra kropsfatan og kropsrúm enn flest onnur. Tí eru tey ofta óttafull, um ein kemur teimum kropsliga ov nær, og tískil er av alstórum týdningi, at ein góð relatión er ímillum partarnar við áliti og tryggleika. Sólrun leggur dent á, at pedagogisk vøddamýking er ikki ein viðgerðarháttur – nakrar viðgerðir, og so ert tú frískur. Pedagogisk vøddamýking snýr seg um at skapa vælveru, og hvussu eg beri meg at mótvegis borgaranum, soleiðis at vit kenna okkum trygg hvør mótvegis øðrum. Hjá einum pedagogiskum vøddamýkjara ræður fyrst og fremst um at finna eina mannagongd, so hann kemur í neyvt samband við borgaran og altíð tekur útgangsstøði í viðkomandi. Tað ræður um at byggja eina góða relatión upp við persónin, sum tú hevur við at gera, og at samveran og samspælið verður tað besta, so báðir partar veruliga kunnu geva hvørjum øðrum dygd.

Sólrun nam sær útbúgvingina hjá Eirik Tollefsen, sum er norðmaður og býr í Århus, har hann vanliga skipar fyri síni útbúgving. Eirik hevur skipað hesa somu útbúgving í Føroyum, og 12 pedagogar, ið starvast innan Nærverkið, nomu sær tá hesa útbúgving. Um áhugi er fyri tí, so hevur Eirik játtað at endurtaka útbúgvingina í Føroyum. Sí heimasíðu: www.cfpm.dk Center for pedagogisk massage v/ Eirik Tollefsen. Eisini kunnu nøkur videobrot síggjast á youtube: pedagogisk massaga.



*Sólrun Ziska saman við Hans Jákupi Dam Poulsen, sum situr við hitapútuni, ið er eitt av amboðunum, Sólrun brúkar í viðgerðini. Filmin, sum Hans Jákup hevur í hondini, hevur Eirik Tollefsen latið gjørt um pedagogiska vøddamýking og hann er partvíst upptikin á Virkni.*




## *Nýklaktir námsfrøðingar í netlesandi*

21 føroyingar, hava lokið prógv 20. januar 2012 via fjarlestur á skúlanum UCC Hillerød sum Professionsbachelor í námsfrøði.

Ovast frá vinstru: Hildubjørg Jensen, Katrin Haraldsen, Rannvá Knudsen, Jan Jacobsen, Elin Hansen, Maud Johansen, Hervør Heinesen. Í miðjuni eru frá vinstru: Sólrun Jensen, Oluffa Andreasen, Ragnhild Justesen, Tove Nielsen, Brynhild Olsen, Hannepaula Viderø, Emly Olsen, Brynhild Sørensen, Ester Gregersen lærari. Sitandi frá vinstru: Morid Mikkelsen, Nina Fossadal, Margee Dam, Lis Eliasen, Anita Jensen, Jónleyg Weihe.


lív.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Persónlig eftirløn
Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya størsta og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Innlit í útlit
ekko 239 239